**Uttanríkisráðið**

Sendistova Føroya í London



# FØRLEIKI Í ÚTLEGD

HUGBURÐAR, SAMLEIKAR OG FRAMTÍÐARÆTLANIR HJÁ ÚTISETUM Í BRETLANDI

Rógvi Absalonsen

London 2009

**Samandráttur**

Henda verkætlan viðgerð hugburðar, samleikar og framtíðarætlanir hjá føroyskum útisetum í Bretlandi. Høvuðsorsøkin hjá føroyingum at flyta av landinum er útbúgving. Eins og aðrastaðni í vesturheiminum er talið á føroyingum, ið taka hægri útbúgving, vaksandi. Eftirspurningurin eftir hægri útbúgvingum kann ikki nøktast í Føroyum, og tí hava verið nógv, ið hava leitað sær uttanlands, serliga til Danmarkar, har flestar útbúgvingar eru ókeypis. Men seinastu árini er talið á føroyingum, ið fara til Bretlands, hækkað. Gongdin tók av álvara dik á seg, tá ið Stuðulsstovnurin í 1999 fekk hækkað ÚSUN (Útbúgvingarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond) upp í 120.000 kr. um árið.

Útisetarnir tykjast at hava eitt ynski um at búgva uttanfyri Føroyar, í minsta lagi meðan teir lesa. Tað eru nógv, sum flyta til Bretlands við ynskinum um at "royna okkurt nýtt". Eisini síggja vit, at fólk ikki bara klára seg væl í arbeiði og útbúgving, men hava eisini sera lætt við at finna seg til rættis og trívast í nýggjum sosialum umhvørvi.

Hugburðurin hjá útisetum er merktur av tvílyndi, tí teir síggja bæði fyrimunir og vansar við at búgva í Føroyum. Sum heild vera Føroyar hildnar at vera eitt lokkandi stað at búgva fyri tey, sum leggja stóran dent á tryggleika, familju og barnauppaling; og minni lokkandi fyri tey, sum eru framsøkin viðvíkjandi yrkisleið. Fyri summi verður tað, at flyta heimaftur, hildið at vera eitt afturstig á yrkisleiðini. Fatanin av føroyska arbeiðsmarknaðinum tykist sostatt at vera, at hann er tryggur men ikki spennandi.

Kanningin vísir, at tað eru trý mál, umframt starvsmøguleikar, sum útisetarnir eru serliga misnøgdir við, og sum hava stóra ávirkan á avgerðina um bústað í framtíðini. Eitt er, at samfelagið er konservativt, til dømis tað, at politikkarar eru ov upptiknir av fiskivinnu og viljin til at fáa nýggjar vinnur upp at standa manglar; og at føroyskur politikkur er ov nógv merktur av átrúnaði. Tað næsta er, at tað er ov dýrt at ferðast til og úr Føroyum, og tað triðja er, at bústaðarviðurskiftini ikki eru nøktandi.

Útisetar í Bretlandi kenna seg fyrst og fremst sum føroyingar, men nógvir tykjast eisini at hava fingið eina sterkari norðurlendska samleikakenslu síðani teir fluttu av landinum. Summi av teimum sum hava búð í Bretlandi í nógv ár, siga seg kenna seg bretskan á onkran hátt. Greitt er, at hóast summi siga seg hava aðrar samleikar enn tann føroyska, so broytir hetta sera lítið (um nakað) uppá føroysku samleikakensluna, sum í flestu førum verður verandi líka sterk sum áður. Sostatt koma hinir samleikarnir ikki ístaðin, men leggjast afturat tí føroyska.

Hóast føroyska samleikakenslan er sterk hjá allarflestu av útisetunum, kann hetta ikki takast sum tekin um, at teir ætla sær at flyta heimaftur, hóast ein stórur partur av teimum ikki útihýsir møguleikanum. Sera fá av hesum fólkum hava tikið endaliga avgerð um, hvat tey ætla at gera, og hvar tey ætla at búgva, í framtíðini. Vert er at nevna, at flestu útisetarnir halda tað vera sannlíkt at búgva í Føroyum, men, sum áður nevnt, eru sera fá, sum vita við vissu hvat framtíðin hjá teimum inniber. Orsøkin kann vera, at luttakararnir eru ungir – teir allarflestu eru yngri enn 30 ár – og ein sera stórur partur er lesandi. Ein leysligur og flótandi hugburður viðvíkjandi framtíðarætlanum er sostatt nakað, sum, sambært kanningini, eyðkennir ungar føroyskar útisetar.

Líkt er til, at talið á útisetum, í Bretlandi og aðrastaðni, fer at vaksa í framtíðini. Nøkur av hesum fara óivað at flyta heimaftur eftir nøkur ár, men hjá øðrum eru Føroyar ikki partur av framtíðarætlanunum. Loysnin uppá hesar trupulleikar er ikki einføld, og til tess at betra um møguleikan, at hesir sokallaðu "førleikar í útlegd" kunnu koma samfelagnum til góðar seinni, er tað umráðandi, at ein veruligur útisetapolitikkur verður orðaður, sum inniber eitt meira umfatandi samskifti við útisetar og eina áhaldandi dagføring av vitan okkara um føroyingar búsitandi uttanlands.

**Summary**

This study deals with attitudes, identities and future plans of Faroese migrants currently residing in the United Kingdom. The chief reason for Faroese people to emigrate from the Faroes is the inclination to obtain higher education. Because of the limited choice of degrees available in the Faroes – and the fact that Denmark offers all Danish citizens (including Faroese and Greenlanders) free university education – Denmark has naturally been the most common destination for these migrants. However, since the Faroese student grant fund Stuðulsstovnurin in 1999 started to offer sponsorships of up to 120,000 DKK per year for higher education obtained outside of Denmark, the number of Faroese migrants to the United Kingdom has risen every year.

The respondents seem to have a desire to live abroad for a few years – at least during their studies. Many of them listed "trying something new" as one of the reasons to move to the United Kingdom. Once there, they generally settle easily into their new lives, and seem to, not only do well in jobs and education, but also to thrive in their new social environments.

The respondents' attitudes are paradoxical, as most of them recognise great advantages and disadvantages to living in the Faroes. The Faroes are generally seen as an attractive place for those who emphasise safety, family life and bringing up children; and less inviting for ambitious individuals who put higher emphasis on their careers. For some, moving to the Faroes is seen as a step backwards on one's career path. Thus, the respondents' general impression of the Faroese labour market is that it is safe but unexciting.

In addition to the lack of job possibilities in the Faroes, three other issues were generally negatively perceived by the respondents and were said to have an impact on whether or not they would choose to live in the Faroes in the future. Firstly, the Faroese society is perceived as conservative in a variety of ways. For example, politicians are too absorbed in the fishing industry, which makes them neglect possibilities to promote other forms of industry; and politics are too often influenced by religion. Secondly, transport to and from the Faroe Islands is seen as too expensive, and thirdly, choice in housing in the Faroes is perceived as limited.

The respondents have a strong Faroese identity, and many of them seem to develop a stronger Nordic identity when they move from the Faroes. Also, those who have lived in the United Kingdom for many years reveal that they feel British to some degree. Although the respondents are able to develop other identities, such as Nordic or British, the Faroese identity remains by far the strongest. Thus, the Faroese identity is not replaced, but is accompanied by other identities, so that, on an individual level, the sense of belonging becomes multi-layered.

But even if the Faroese identity remains strong this cannot be taken as a sign that the respondents want to live in the Faroes in the future. Many of them say that they will possibly or probably live in the Faroes, but very rarely have clear-cut ideas about what the future may involve. The research showed that very few of the respondents have made up their mind about their future country of residence. This may be due to the fact that many of them are young – most of them 30 years or younger – and most of them are students. They have a loose and fluid attitude towards future planning.

The amount of Faroese people living in the United Kingdom is likely to increase in the coming years. Some of these will probably move back after a while, whereas for others the Faroes are not necessarily included in future plans. This is a complex issue, which is why improved dialogue and continuous research on Faroese emigrants would be necessary in order to find out how to make it more appealing for them to move back.

## Formæli

Endamálið við hesi ritgerð er at byggja undir vitanina um føroysk lesandi uttanlands og útisetar sum heild, og at seta evnið útisetar á dagsskránna í Føroyum. Ein av mest átrokandi spurningum í hesum sambandi er, hvørjar høvuðsorsøkirnar eru til, at summir føroyingar ikki hava ætlanir um, ella hug til, at flyta aftur til Føroya eftir at hava búð uttanlands í eina tíð, og hví aðrir ætla at flyta heimaftur.

Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi ("NAB" eftir hetta) gav í 2008 út bóklingar við heitunum *Hagtøl um Føroyskar útisetar*, *Hví føroyingar búseta seg í Danmark* og *Eg vil so fegin hava, at børnini læra føroyskt*.[1] Við hesum var roynt at lýsa tilveruna hjá føroyskum útisetum í Danmark, hugburðar teirra viðvíkjandi føroyska samfelagnum, og hvat eyðkennir teir, ið ikki hava ætlanir um at flyta heimaftur í framtíðini. Kanningarnar hjá NAB vóru sera týdningarmiklar, tí tær góvu hvørjum føroyingi – serfrøðingum, politikkarum og øðrum – møguleika at luttaka í kjakinum um útisetar í Danmark. Vitan okkara um hetta evnið hevur verið sera avmarkað, og kanningarnar góvu bæði greiðar og minni greiðar ábendingar um hugburðar hjá føroyingum búsitandi í Danmark. Hetta hevur skapt eitt kjak millum føroyingar úti og heima, sum einans kann vera til fyrimuns fyri samfelagið.

Henda ritgerð er ein roynd at breiðka kjakið til eisini at umfata føroyingar búsitandi í Bretlandi. Við kanningini fer at bera til at samanbera útisetar í Danmark við teir í Bretlandi. Tó má havast í huga, at talið á útisetum er væl lægri í Bretlandi enn í Danmark, og tí ber ikki eins væl til at gera avgjørdar niðurstøður um tilveruna hjá teimum, og hvussu teir møguliga ávirkast av vertslandinum. Hinvegin eru so fáar upplýsingar um føroyingar uttan fyri Føroyar, at ábendingar, sum ein slík kanning kann geva, eru bæði áhugaverdar og ómetaliga neyðugar.

Eg vil fegin takka teimum, sum hava víst verkætlanini áhuga, og sum hava hjálpt og samstarvað við mær á ymsan hátt. Hesi eru Sigga Jacobsen og Áki Johansen á Sendistovuni í London, Stuðulsstovnurin, Meginfelag Føroyskra Studenta, Føroyingafelagið í London, Tórshavnar Kommuna, Atlantic Airways, Eik, Mentamálaráðið, Samvit, Vinnuhúsið o.o. Myndina á forsíðuni hevur Sámal Blak teknað.

[1] Sí heimasíðuna hjá Norðuratlantsbólkinum, http://www.dnag.dk/index.php?id=752

Mín vón er sjálvandi, at kanningin lýst niðanfyri fer at fáa enn meiri gongd á kjakið um føroyskar útisetar, men eisini at sjálvt kjakið elvir til eina breiðari og betri fatan av avbjóðingini, sum stendur fyri framman.

*Rógvi Absalonsen, á vári 2009*

# Innihaldsyvirlit


1. Inngangur ... 6

2. Granskingarsnið og avmarkingar ... 9

   2.1. Kvantitativa kanningin ... 9

   2.2. Kvalitativa kanningin ... 10

3. Kvantitativa kanningin ... 12

   3.1. Demografisk samanseting ... 12

   3.2. Viðurskifti í Bretlandi ... 12

   3.3. Samband við Føroyar og føroyingar ... 14

   3.4. Hugburður til føroyska samfelagið ... 14

   3.5. Samleikakenslur ... 16

   3.6. Framtíðarætlanir ... 17

4. Kvalitativa kanningin ... 18

   4.1. Viðurskifti í Bretlandi ... 18

   4.2. Samband við Føroyar og føroyingar ... 20

   4.3. Hugburður til føroyska samfelagið ... 21

   4.4. Samleikakenslur ... 25

   4.5. Framtíðarætlanir ... 26

5. Kjak og niðurstøður ... 29

6. Fylgiskjøl ... 32

   6.1. Myndir frá kvantitativu kanningini ... 32

   6.2. Sitat frá kvalitativu kanningini ... 50

# 1. Inngangur

Um allan heim er tilflyting ella fráflyting blivin meira vanlig. Tøkniligar og hugburðsligar broytingar gera, at fólk, sum annars skulu eitast at "hoyra til" eitt ávíst stað ella land, hava lættari við at flyta til og búleikast í øðrum støðum ella londum. Føroyar eru einki undantak hesum viðvíkjandi. Vit eru partur av einum kosmopolitiskum og meira ella minni altjóðagjørdum heimi, sum eisini í størri og størri mun er merktur av einari skjótari og áhaldandi útbreiðslu av miðlum. Føroyingar búsitandi í Føroyum uppliva sostatt ikki bert teirra egna lokala umhvørvi, men nú eisini onnur umhvørvi bæði umvegis miðlar og við tað, at tað er lættari at vitja onnur lond. Tað, sum fyrr hevði verið kallað ókent og fremmant, er ikki so ókent og fremmant longur, og soleiðis kenna eisini føroyingar seg meira fríar at búgva aðrastaðni enn í Føroyum.

Fráflytingin ger seg serliga galdandi millum føroyingar, ið vilja lesa á universiteti. Eins og aðrastaðni í vesturheiminum er talið á føroyingum, ið taka hægri útbúgving, vaksandi. Vælferðarsamfelagið, sum mentist í Føroyum í 60- og 70-árunum, hevði við sær, at ein mongd av fólki hevði møguleika at læra á hægri lærustovni. Stóri eftirspurningurin eftir hægri útbúgvingum kundi ikki nøktast í Føroyum, og tí vóru fleiri, ið leitaðu sær uttanlands, serliga til Danmarkar.

Soleiðis byrjaði mynstrið, sum vit kenna so væl í dag. Millum fleiri onnur lond eru Føroyar í eini serstøðu við tað, at ein sera stórur partur av unga ættarliðnum og meginparturin av universitetslesandi búgva uttanlands. Tað, at eitt stórt tal av føroyingum antin eru í lestrarørindum ella vera verandi eftir loknað útbúgving, merkir, at ein hópur av tilfeingi hevur varandi sæti uttan fyri Føroyar. Hetta noyðist ikki at vera ein trupulleiki í sjálvum sær, men um vit ynskja menning í samfelagnum, er tað ein vandi, um hetta tilfeingi ella hesir "førleikar í útlegd" ongantíð vera til ágóða fyri Føroyar ella føroyingar.

Kanningarnar, sum NAB almannakunngjørdi í 2008, geva okkum nakrar ábendingar um veruleikan. Tær vísa millum annað, at nógvir útisetar í Danmark ikki hava ætlanir um at flyta aftur til Føroya, og at orsøkirnar til hetta kunnu vera sera ymiskar (hóast nakrar týðiliga viga meiri enn aðrar). Kanningarnar benda sostatt á, at trupulleikin lýstur í reglubrotinum omanfyri er veruligur, og at Føroyar og føroyingar hava eina avbjóðing, sum er skapt av modernisering og (heldur ironiskt) øktari vælferð bæði heima og í londunum næst okkum.

Henda kanning um útisetar í Bretlandi er ein nýggjur liður í gongdini at svara sama átrokandi spurningi: Hví ætla summir føroyingar ikki at flyta heimaftur eftir at hava búð uttanlands í eina tíð; og hví ætla aðrir at flyta heimaftur?

Um ein ynskir at samanbera hesa kanning við tølini hjá NAB, er vert at hava í huga, at í Danmark er bólkurin av føroyskum útisetum fleiri ferðir størri og væl meira fjølbroyttur (viðvíkjandi aldri, arbeiði, útbúgving o.ø.) enn í nøkrum øðrum landi. Talið á føroyingum í Bretlandi er ókent, men hildið verður, at tað liggur onkustaðni um 300[2], um vit einans telja tey við, sum eru fødd í Føroyum. Talið á føroyskum lesandi í Bretlandi verður í skrivandi stund mett at vera onkustaðni ímillum 140 og 160. Nógv av hesum eru skrásett í ÚSUN (Útbúgvingarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond) og tey flestu eru í ferðastuðulsskipanini hjá Stuðulsstovninum[3].

Hóast einstakir føroyingar hava tikið útbúgving í Bretlandi í 80- og 90-árunum og helst eisini áðrenn tað, so er tað, at nógv fólk fara at lesa í Bretlandi, eitt hampiliga nýtt fyribrigdi í føroyskum samanhangi. Gongdin tók av álvara dik á seg, tá ið Stuðulsstovnurin í 1999 fekk hækkað ÚSUN gjaldið úr 60.000 kr. upp í 120.000 kr. Hetta hevði við sær, at tað bleiv minni veruleikafjart fyri føroyingar at taka útbúgving í Bretlandi og aðrastaðni, tí fíggjarligu fortreytirnar blivu í flestu førum tær somu sum hjá teimum, ið fóru til Danmarkar at lesa.

Sambært hagtølum frá Stuðulsstovninum var samlaða talið av lesandi føroyingum, t.v.s. allir føroyingar í hægri lesnaði, 1.477 í 2004/05, 1.509 í 2005/06 og 1.520 í 2006/07. Parturin av lesandi í Danmark minkaði hesi árini. Í 2004/05 vóru 53.3% av øllum føroyskum lesandi búsitandi í Danmark. Í 2005/06 var hetta minkað niður í 52.3% og í 2006/07 niður í 50.9%. Somu árini var parturin av lesandi í Bretlandi vaksandi. Her var tað 4.1% í 2004/05, 5.1% í 2005/06 og 6.2% í 2006/07. Gongdin hevur verið spakulig, men um hon heldur fram, verður tað um nøkur ár líka viðkomandi og týdningarmikið at tosa um útisetar í Bretlandi sum um útisetar í Danmark.

Men hóast føroyskir útisetar búleikast í ymiskum býum í ymiskum londum, er tað sera umráðandi, at vit hyggja at heildini; at vit síggja útisetar sum ein part av føroyska

[2] Tíverri hevur eingin eftirlit við, hvussu nógvir føroyingar búgva í Bretlandi. Metingin er gjørd av Sendistovuni í London.

[3] Síðani Skotska stjórnin í 2007 tók gjaldið fyri hægri útbúgvingar burtur, eru føroysk lesandi í Skotlandi ikki longur í ÚSUN skipanini. Síðani hetta hevur borið illa til at finna neyva talið av føroyskum lesandi í Bretlandi. Tó veit Stuðulsstovnurin við vissu, at talið á lesandi í Bretlandi eisini er vaksið nógv síðani 2007.

samfelagnum og, ikki minst, "føroyska samleikanum". At føroyingar í Føroyum eru tilvitaðir um, at hugtakið "Føroyar" ikki einans fevnir um *eitt* stað, og fólkið sum har býr, men eisini strekkir seg út um landoddarnar, er týdningarmikið, um vit politiskt skulu kunna skapa teir neyðugu karmarnar til hesar sokallaðu "førleikar í útlegd" at vera til ágóða fyri samfelagið í framtíðini.

Í kapitli 2 verður greitt frá granskingarsniði og avmarkingum í sambandi við kanningina. Kapittul 3 er ein gjøgnumgongd av teimum mest týðandi úrslitunum av kvantitativu kanningini, og kapittul 4 viðgerð kvalitativar samrøður, sum gjørdar vóru við útisetar í Bretlandi. Kapittul 5 tekur samanum og greiðir frá niðurstøðum og ábendingum, sum komu burturúr báðum kanningunum.

## 2. Granskingarsnið og avmarkingar

Kanningin, sum er grundarlag fyri ritgerðini, varð gjørd millum útisetar í Bretlandi í seinnu helvt av 2008 og januar 2009. Talan er um tveir partar, ein kvantitativan og ein kvalitativan.

### 2.1. Kvantitativa kanningin

Spurnablaðið, sum nýtt varð í kvantitativu kanningini, líkist sera nógv spurnablaðnum hjá NAB. Nógvir av spurningunum eru fullkomiliga eins, aðrir eru broyttir nakað, og uppaftur aðrir eru nýggir. Sum heild er kvantitativa kanningin gjørd soleiðis, at ein kann samanbera við útisetar í Danmark. Tílíkar samanberingar mugu tó gerast við tí í huga, at stórir demografiskir munir eru millum útisetar í Bretlandi og útisetar í Danmark. Nevnast kann millum annað, at útisetarnir í Bretlandi eru fáir í tali, eru sum heild sera ungir og hava eitt rættiliga stórt býti av lesandi í mun til útisetar í Danmark.

Spurnablaðið varð sent út elektroniskt til 140 fólk. 120 av hesum svaraðu; 78 av teimum vóru lesandi. Havast má í huga, at brádligi vøksturin av lesandi í Bretlandi seinastu árini hevur við sær, at nógvir av luttakarunum hava búð í Bretlandi í stutta tíð. Tískil hevði helst verið enn meira viðkomandi at gjørt líknandi kanning um nøkur ár, tá ið (óivað) fleiri útisetar eru í Bretlandi tilsamans, og fleiri av núverandi útisetum hava búð har í longri tíð.

Ung og lesandi eru væl umboðað millum luttakararnar í kvantitativa partinum. Orsøkin til hetta er, at tað var torførari at fáa fatur á tilkomnum og eldri útisetum, sum hava búð í Bretlandi í nógv ár, enn tað var at finna yngri og lesandi útisetar, sum hava búð í Bretlandi í stutta tíð[4]. Tískil kann talan vera um eina undirumboðan av arbeiðandi útisetum og eina yvirumboðan av lesandi útisetum millum luttakararnar.

Tá ið ein hyggur at myndunum aftast í ritgerðini, er eisini umráðandi at hava í huga, at summi prosenttøl eru grundað á sera fá fólk. Til dømis, tá ið ein hyggur at mynd 19, “Tilknýti til Bretland í mun til longd á uppihaldi”, sæst, at bert 8 av luttakarunum hava búð 5 ár, 10 hava búð 6-10 ár og 10 hava búð 11 ár ella longur í Bretlandi. Hóast vit fáa nakrar ábendingar um, hvussu tilknýtið til Bretlands broytist eftir, hvussu leingi útisetin hevur búð har, so mugu prosenttøl takast við stórum fyrivarni, tá ið N er so lítið, sum tað er í hesari og nøkrum av hinum myndunum.

[4] Til dømis vóru nógv lesandi funnin umvegis Meginfelag Føroyskra Studenta.

## 2.2. Kvalitativa kanningin

Kvalitativi parturin er bygdur á semi-struktureraðar samrøður við 15 einstaklingar. Felags fyri luttakararnir í kvalitativa partinum er, at allir hava búð í Bretlandi í tvey ár ella longur. Henda avmarking varð gjørd, fyri at samrøðuluttakararnir skuldu hava havt nøkur ár at hugleitt um teirra tilveru í Bretlandi og teirra hugburð til Føroyar í hesum sambandi.

Kvalitativar kanningar, sum tann lýst í Kapitli 4, eru *smalar*, tí tær eru grundaðar á upplýsingar um fá fólk, og *djúpar*, tí at samrøðurnar ikki bara skulu brúkast, at finna útav *hvørjar* hugburðar fólk hava, men eisini *hví* ella *hvussu* hesi hava fingið sínar hugburðar.

Samrøðurnar vóru heldur ymiskar, við tað at luttakararnir ikki løgdu líka stóran dent á ávís mál, sum tikin vóru upp undir orðaskiftinum. Tó var ein roynd gjørd at hava samrøðurnar innan fyri nakrar ávísar, men ikki alt ov fastar, rammur. Styrkin við kvalitativum einstaklingasamrøðum er nevniliga liðileiki, og tí fingu luttakararnir ofta loyvi at flyta seg inn á evni, sum ikki vóru í upprunaligu samrøðuætlanini. Ein tílík samrøða hevur tann eginleika, at hon kann avdúka ymiskt viðkomandi, sum granskarin møguliga ikki hevði hugsað um sjálv/ur. At luttakararnir onkuntíð fingu fríar ræsur merkti, at eitt stórt tal av áhugaverdum og viðkomandi málum blivu viðgjørd.

Teir týdningarmiklastu spurningarnir, sum vóru viðgjørdir í samrøðunum, vóru:

- Viðurskifti í Bretlandi: Hví valdu luttakararnir at fara til Bretlands upprunaliga? Hvussu trívast tey í Bretlandi? Hvør er hugburðurin mótvegis bretskari mentan og øðrum mentanum, sum tey hava havt samband við undir uppihaldinum?
- Samband við Føroyar og føroyingar: Hvussu ofta verður vitja til Føroya? Í hvønn mun hava luttakararnir samband við aðrar føroyingar í Bretlandi?
- Hugburður til føroyska samfelagið: Hvat halda luttakararnir er gott og/ella ringt við føroyska samfelagnum?
- Samleikakenslur: Í hvønn mun kenna luttakararnir seg sum føroyingar? Í hvønn mun kenna tey seg sum annað enn føroyingar? Eru samleikarnir teir somu, sum áðrenn flutt var til Bretlands?

- Framtíðarætlanir: Hvørji eru útlitini til, at luttakararnir fara at flyta aftur til Føroya? Hvat (um nakað) skal henda, áðrenn tey fáa hug (ella fáa betri hug) at flyta heimaftur?

Ætlanin er ikki, at kvalitativi parturin skal vera umboðandi fyri allar føroyingar búsitandi í Bretlandi. Heldur eigur hann at leggja afturat kvantitativa partinum við at geva ábendingar um, hvussu *summir* útisetar hugsa, og hvussu hugburðurin hjá hesum tykist at vera mótvegis føroyska samfelagnum við bakstøði í tilveru teirra í Bretlandi.

# 3. Kvantitativa kanningin

Legg til merkis, at úrslitini av kvantitativu kanningini kunnu síggjast í myndum aftast í ritgerðini (7.1. Myndir frá kvantitativu kanningini). Teksturin niðanfyri vísir til hesar myndir, so hvørt sum tær gerast viðkomandi. Kanningin fevnir rættiliga vítt, og allar myndirnar verða ikki viðgjørdar í tekstinum. Viðmerkingar eru gjørdar til tey úrslit, sum undirritaði heldur vera mest viðkomandi og áhugaverd. Tó skal dentur leggjast á, at møguligt er hjá hvørjum einstøkum lesara at hava sínar egnu tulkingar av úrslitunum og eisini metingar um, hvat er mest viðkomandi.

## 3.1. Demografisk samanseting

Kynsbýtið av føroyskum útisetum í Bretlandi er rættiliga javnt (mynd 1), serliga um vit samanbera við útisetar í Danmark, har talan er um nógv fleiri kvinnur í mun til menn. Útisetar í Bretlandi eru eisini rættiliga ungir. Millum annað síggja vit, at væl omanfyri ein triðingur av teimum eru í aldursbólkinum 20-24, og sera fá eru 30 ár ella eldri (mynd 2). Sera stórur partur av teimum eru undir útbúgving, og nógv eru byrjað uppá útbúgvingina fyri stuttari tíð síðan (mynd 12).

## 3.2. Viðurskifti í Bretlandi

Nógvir av útisetunum hava búð í Bretlandi í stutta tíð (mynd 5). Sum dømi kann nevnast, at meiri enn ein fimtipartur av øllum luttakarunum hevur búð í Bretlandi í minni enn eitt ár. Við at samanbera mynd 5 og mynd 12 kunnu vit staðfesta, at heilt nógvir av hesum "nýggju" útisetum eru byrjaðir uppá útbúgving á heysti í 2008. Knappligi vøksturin av føroyskum lesandi í Bretlandi sæst, við tað at ein stórur meginpartur av luttakarunum hevur búð í Bretlandi í 4 ár ella minni, sum eisini er vanliga longdin á útbúgvingum í Bretlandi.

Sera nógvir av luttakarunum hava útbúgving sum orsøk til at koma til Bretlands (mynd 6). Havast má í huga, at mynd 6 er ein einføld útgáva av veruleikanum, tí at allar møguligar orsøkir, sum fólk kunnu hava til at flyta til Bretlands, eru ikki umboðaðar. Tó síggja vit, at tey flestu leita sær til Bretlands at fáa útbúgving, og rættiliga nógv vilja "royna okkurt nýtt".

Útbúgving er eisini størsta orsøkin hjá fólki at búgva í Bretlani í løtuni. Næstan tveir triðingar av luttakarunum eru í Bretlandi í løtuni, tí tey eru undir útbúgving, meðan umleið ein fimtipartur hevur arbeiði sum orsøk (mynd 7 og 8). Her er talan um rættiliga stóran mun, um vit samanbera við kanningina hjá NAB, har nógv fleiri høvdu fulltíðararbeiði í Danmark.

Orsøkin til stóra munin millum útisetar í Danmark og í Bretlandi er óivað tann, at tað hevur verið vanligt hjá føroyingum at flutt til og búleikast í Danmark í nógv áratíggir, meðan tað er stutt síðani at føroyingar byrjaðu at flyta til Bretlands í stórum tali.

Í myndunum 9, 10 og 11 eru tveir bólkar umboðaðir: Tey, sum eru í ferð við útbúgving í Bretlandi, og tey, sum einaferð hava tikið útbúgving í Bretlandi. Eitt, sum ger seg týðiliga galdandi, er, at rættiliga nógvir føroyingar fáa sær samfelagsvísindaliga útbúgving í Bretlandi. Tó eru handilsfrøðiligar, hugvísindaligar og listarligar útbúgvingar eisini væl umboðaðar; í øllum førum millum tey, sum eru undir útbúgving í løtuni (mynd 9).

Flestu útbúgvingar, sum vera tiknar í Bretlandi, eru miðallangar (mynd 10). Hetta er ikki óvæntað, tí fáar einstakar útbúgvingar í Bretlandi eru longri enn 4 ár. Tær útbúgvingar, sum taka longri tíð, eru ofta innan faklig øki, sum ikki eru so væl umboðað í mynd 9, til dømis løgfrøði, læknavísind og verkfrøði.

Nógvir útisetar í Bretlandi høvdu ikki verið áhugaðir í at tikið útbúgvingina í Føroyum um hetta var møguligt (mynd 11). Orsøkirnar til hetta kunnu vera nógvar, men hugsast kann, at nógv hava hug at búgva í fremmandum landi, ella “royna okkurt nýtt” (mynd 6), samstundis sum tey útbúgva seg. Tó skal leggjast afturat, at heilt fitt av fólki høvdu, ella høvdu kanska, tikið útbúgvingina ella partar av henni í Føroyum um gjørligt. Um vit leggja tey, sum hava sagt “ja”, saman við teimum sum hava sagt “ivandi” í mynd 11, er talan um ein rættiliga stóran bólk, sum ikki hevði útihýst møguleikanum at tikið útbúgving í Føroyum.

Størsti partur av lesandi føroyingum í Bretlandi eru á fyrsta ári av síni útbúgving. Harafturat er næstan ein triðingur á øðrum ári (mynd 12). Vert er at nevna, at nøkur av teimum, sum hava svarað “á 1. ári”, hava møguliga búð í Bretlandi í fleiri ár, tí summi kunnu vera á fyrsta ári av Master útbúgving. Sostatt er møguligt, at myndin ikki vísir ágreiniliga, hvussu nógv eru komin til Bretlands at lesa í 2008. Hinvegin, um vit hyggja at og samanbera mynd 5, “Longd á uppihaldi í Bretlandi”, við mynd 12 ,“Hvussu langt lesandi útisetar eru komnir við síni útbúgving”, kunnu vit vera rættiliga vís í, at nógv av teimum, sum hava búð í Bretlandi í minni enn eitt ár, eru á 1. ári av síni útbúgving og umvent, tí talan er um sera stórt býti av øllum luttakarunum.

Flestu føroyskir útisetar trívast í Bretlandi. Næstan tveir triðingar av luttakarunum søgdu seg trívast “sera væl”, meðan ein hampiliga stórur partur segði seg trívast “væl” (mynd 17).

Trivnaður og tilknýti ganga ikki hond í hond, tí flestu av luttakarunum siga seg bara hava "nakað av tilknýti" til bretska samfelagið (mynd 18). Sostatt ber væl til at trívast í einum landi, hóast tilknýtið ikki er sterkt.

Tað er púra greitt, at útisetar fáa sterkari tilknýti til sítt vertsland, jú longur teir búgva har. Nógvir av luttakarunum, sum søgdu seg hava "einki tilknýti" ella "nakað av tilknýti" hava búð í Bretlandi í fá ár, meðan tey flestu, sum søgdu seg hava "sterkt tilknýti" ella "sera sterkt tilknýti", hava búð har í longri tíð (mynd 19). Hetta samsvarar við kvantitativu kanningina hjá NAB, har føroyingar, ið hava búð í Danmark leingi, vístu seg at hava sterkari tilknýti til danska samfelagið.

Næstan helvtin av luttakarunum hava sosiala samveru við ikki-føroysk vinfólk hvønn dag, meðan fyri ein góðan triðing er tað hvørja viku (mynd 20). Hetta er helst ikki óvæntað, tí fáir føroyingar eru í Bretlandi í løtuni, og tískil liggur ikki so væl fyri hjá nógvum at vera saman við øðrum føroyingum í gerandisdegnum. Hetta eru tey flestu, ið fara til Bretlands, óivað tilvitað um, og tað kann tí hugsast, at tey eru fyrireikað uppá at samskifta nógv við ikki-føroyingar.

## 3.3. Samband við Føroyar og føroyingar

Útisetarnir í Bretlandi hava rættiliga sterkt og regluligt samband við Føroyar og/ella føroyingar. Ein stórur meiriluti hevði verið í Føroyum fyri minni enn 6 mánaðum síðani (mynd 27). Tað er sostatt sannlíkt, at flestu av luttakarunum vitja Føroyar regluliga. Eisini síggja vit, at meiri enn helvtin av teimum eru saman við føroyskum vinfólkum, sum eisini búgva í Bretlandi, antin hvønn dag ella hvørja viku[5] (mynd 28), og at ein greiður meiriluti brúkar føroyskar fjølmiðlar hvønn dag (mynd 29). Stóra nýtslan av føroyskum fjølmiðlum kann hugsast at samsvara við stóra áhugan í føroyskum politikki (mynd 23). Nýtslan av føroyskum fjølmiðlum styrkir óivað um henda áhuga. Hinvegin er eisini møguligt at áhugin fyri føroyskum politikki økir um nýtsluna av fjølmiðlum, tó at tað eisini kunnu vera aðrir áhugar, sum birta uppundir.

## 3.4. Hugburður til føroyska samfelagið

Myndirnar frá 30 til 44 vísa hugburð hjá útisetum til føroyska samfelagið. Myndirnar frá 30 til 35 viðgera fyrimunir ella ymiskt, sum útisetar kunnu hugsast at síggja sum orsøkir til at

[5] Við at samanbera mynd 28 við mynd 20 síggja vit, at luttakararnir eru nakað meiri saman við ikki-føroyskum vinfólki enn saman við føroyskum vinfólki, tá ið tey eru í Bretlandi.

flyta til ella búgva í Føroyum, meðan myndirnar frá 36 til 44 viðgera vansar ella ymiskt, sum útisetar kunnu hugsast at síggja sum orsøkir til *ikki* at flyta til ella búgva í Føroyum. Myndirnar frá 30 til 44 hava myndir afturat sær, til dømis 30.a, sum vísa týdningin av viðkomandi spurningum fyri avgerðina um, hvørjum landi útisetarnir vilja búgva í.

Millum fyrimunirnar sæst, at flestu av luttakarunum vilja, at teirra børn læra føroyskt (mynd 31), halda tað vera gott hjá børnum at vaksa upp í Føroyum (mynd 34), halda tað hava týdning at vera saman við familju og vinfólki í Føroyum regluliga (mynd 35), ynskja at skapa framgongd í Føroyum (mynd 30) og leingjast eftir náttúruni í Føroyum (mynd 32). Hinvegin var tað minni enn helvtin av luttakarunum, sum segði seg sakna frítíðarítriv/mentanarlig tilboð í Føroyum (mynd 33).

Eisini er munur á, hvussu stóran týdning málini nevnd omanfyri hava fyri avgerðina um, hvørjum landi luttakararnir vilja búgva. Í hesum sambandi kann nevnast, at regluligt samanhald við familju og vinfólk (mynd 35.a), at tað er gott hjá børnum at vaksa upp í Føroyum (mynd 34.a) og ynski um at børnini læra føroyskt (mynd 31.a), vóru tey mál, sum vigaðu nógv, meðan hini trý málini – at skapa framgongd (mynd 30.a), føroyska náttúran (mynd 32.a) og frítíðarítriv/mentanarlig tilboð (mynd 33.a) – høvdu minni týdning.

Millum vansarnar sæst, at sera nógvir av luttakarunum halda, at ferðasambandið til og úr Føroyum ikki er nóg gott (mynd 37), at fakligar avbjóðingar og/ella umhvørvi vanta (mynd 36), at støðið í fólkaskúlanum ikki er nóg gott (mynd 41), at veðrið er ov ringt (mynd 44), at samfelagið er ov konservativt (mynd 39), at tað er ov torført at finna hóskandi bústað (mynd 38), og at frítíðarítriv/mentanarlig tilboð ikki eru nøktandi (mynd 40). Harafturat er tað umleið helvtin av luttakarunum, sum finst at barnaansingarplássum (mynd 42) og væl minni enn helvtin, sum heldur, at fíggjarligar/sosialar stuðulsskipanir í Føroyum ikki eru nøktandi (mynd 43).

Týdningurin av omanfyri nevndu málum var eisini ymiskur í sambandi við val av bústaði. Fakligar avbjóðingar og/ella fakligt umhvørvi (mynd 36.a) vigar mest, men ferðasamband (mynd 37.a), bústaðarviðurskifti (mynd 38.a), og tað, at samfelagið er ov konservativt (mynd 39.a), eru eisini sera týðandi faktorar fyri nógvar av luttakarunum. Fyri umleið ein triðing av luttakarunum hava frítíðarítriv/mentanarlig tilboð (mynd 40.a), barnaansingarpláss (mynd 42.a) og støðið á fólkaskúlanum (mynd 41.a) nógv at siga, meðan ein fjórðingur sigur, at

fíggjarligar/sosialar stuðulsskipanir (mynd 43.a) hava nógv at siga. Tað, sum hevur minst týdning fyri avgerðina um bústaðarland, er veðrið (mynd 44.a).

Nógv av hesum úrslitum líkjast teimum, sum NAB fekk burturúr sínum kanningum. Hóast stórur munur er á demografisku samansetingini av útisetum í Danmark og teimum í Bretlandi kann staðfestast, at teir eru meira ella minni samdir um, hvat teir halda vera gott og ringt við føroyska samfelagnum (hóast onkur untantøk eru hesum viðvíkjandi[6]).

Talva 1 er ein samanbering av mynd 30 og mynd 36. Her síggja vit, at tveir triðingar[7] av luttakarunum vóru bæði "samdir" ella "sera samdir" í, at tað eru vantandi fakligar avbjóðingar og/ella fakligt umhvørvi í Føroyum *og* "samdir" ella "sera samdir" í, at tey vilja skapa framgongd í Føroyum. Sostatt kann tað hugsast, at nógvir av hesum útisetum hava eitt ynski um, at fakligar avbjóðingar og umhvørvi í Føroyum betrast, tí so fáa tey samstundis møguleika at skapa framgongd í heimlandinum.

## 3.5. Samleikakenslur

Teir allarflestu av luttakarunum hava eina sera sterka føroyska samleikakenslu, næstan ein triðingur sigur seg hava eina sterka norðurlendska samleikakenslu, og beint omanfyri ein fimtapart kennir seg "sterkt" sum heimsborgarar. Nógvir av luttakarunum hava miðal norðurlendska, evropeiska ella heimsborgara samleikakenslu. Flestu av luttakarunum hava antin onga ella veika bretska og danska samleikakenslu[8] (mynd 45).

Greitt er, at tey flestu, sum hava búð minni enn 1 ár í Bretlandi hava onga bretska samleikakenslu. Av teimum, sum hava búð eitt sindur longur (1-2 ár), eru nógv, sum hava eina veika bretska samleikakenslu, meðan nógv av teimum, sum hava búð 5 ár og longri

---

[6] Teir einastu týðandi munirnir, sum funnir vóru á hugburðinum hjá útisetum í Danmark og útisetum í Bretlandi vóru viðvíkjandi fíggjarligum og sosialum stuðulsskipanum og ferðasambandi.
Flestu av útisetunum í Danmark hildu fíggjarligar og sosialar stuðulsskipanir í Føroyum vera ónøktandi. Tað hildu útisetarnir í Bretlandi, sum heild, ikki. Orsøkin er møguliga tann, at útisetarnir samanbera Føroyar við sítt vertsland á hesum øki, og gera sær nakrar niðurstøður út frá tí. Bretskar stuðulsskipanir fevna ikki líka breitt sum tilsvarandi skipanir í norðurlondum, og tað kann tí hugsast, at fatanin hjá útisetum í Bretlandi av teimum føroysku skipanunum er betri enn hjá útisetum í Danmark, har stuðulsskipanir eru á sera høgum støði.
Útisetarnir í Bretlandi funnust í nógv størri mun at ferðasambandinum til og úr Føroyum enn útisetarnir í Danmark. Orsøkin til hetta er óivað tann, at títtleikin á flogferðum til Danmarkar er væl hægri enn til Bretlands, og at er einki beinleiðis flogfar er millum Føroyar og Bretland stórar partar av árinum.
[7] Tey fýra tølini skrivað við feitari skrift í talvu 1 telja 66,6% samanlagt, sum umboðar tveir triðingar av luttakarunum.
[8] Teir útisetar, sum hava búð í Bretlandi í stutta tíð hava, eftir hesum at døma, heilt ymiskar fatanir av hugtøkunum "tilknýti" og "samleiki", tí teir hava lættari við at siga seg hava *tilknýti til Bretlands* (mynd 18), enn at teir hava *bretska samleikakenslu* (mynd 45).

hava miðal og sterka bretska samleikakenslu (mynd 46). Hóast fá fólk hava búð leingi í Bretlandi, so er hetta ein ábending um, at fólk kenna seg meira og meira sum bretar, jú longur tey búgva har. Tó vita vit, at næstan allir luttakararnir – eisini tey, sum hava búð leingi – hava eina sterka føroyska samleikakenslu. Harvið er greitt, at tann bretski samleikin *ikki* kemur ístaðin, men legst afturat føroyska samleikanum.

## 3.6. Framtíðarætlanir

Meginparturin av luttakarunum búðu í Tórshavn, áðrenn flutt var til Bretlands (mynd 47), og tey allarflestu vænta eisini at búgva í Suðurstreymoy, um tey flyta aftur til Føroya (mynd 48).

Teir flestu av luttakarunum hugsa antin "sjáldan" ella "við hvørt" um at flyta aftur til Føroya, meðan meiri enn ein fimtapartur hugsar "ofta" um tað (mynd 49). Ein triðingur av luttakarunum heldur tað vera "sera sannlíkt" at búgva í Føroyum í framtíðini, meðan minni enn ein fimtapartur segði tað sama um Bretland. Hóast nógv siga tað vera ósannlíkt, at tey fara at búgva í Danmark ella øðrum norðurlandi, so eru hesir møguleikar eisini "ivamál" og "sannlík" fyri nógvar av luttakarunum (mynd 50).

# 4. Kvalitativa kanningin

Av tí at kvalitativa kanningin viðgjørdi eina ørgrynnu av ymiskum evnum, verða viðmerkingar gjørdar niðanfyri til tey mál, sum undirritaði helt vera mest viðkomandi og áhugaverd fyri føroyska lesaran. Øll viðkomandi sitat eru samlað aftast í ritgerðini (7.2. Sitat frá kvalitativu kanningini), og nøkur fá eru aftast í hvørjum undirkapitli niðanfyri.

## 4.1. Viðurskifti í Bretlandi

Orsøkirnar hjá flestu av luttakarunum at fara til Bretlands upprunaliga var útbúgving. Nakað, sum gekk aftur í samrøðunum við teir luttakararnir, sum lesa, var, at tey, av ymiskum orsøkunum, ynsktu at lesa aðrastaðni enn í Danmark.

Annars vóru tað enska málið, útbúgvingarstuðul (ÚSUN), avbjóðingin í sambandi við at búgva í einum sera stórum býi (í hesum føri London), og samband við fjølmiðlar gjøgnum uppvøksturin (í hesum føri MTV og BBC), sum vóru nevnd í samrøðunum sum orsøkir til at fara til Bretlands at lesa/búgva.

Flestu av luttakarunum kenna seg heima antin í Bretlandi sum heild ella í býnum, har tey búgva. Ein av orsøkunum til hetta er, sambært nøkrum av luttakarunum, at tað er sera lætt hjá útlendingum at hava tað gott, tá ið so nógvir aðrir útlendingar eru í sama stað (í býnum ella á lærustovninum). Eisini verður nevnt, at longsulin heim til Føroya onkuntíð lúrir, og at ein onkuntíð kennir seg "splittaðan" ímillum tvey samfeløg.

Fyri tey, sum búgva í London, er tað ein uppliving at búgva í einum býi við so nógvum mentanum. Sambært tveimum av útisetunum kunnu føroyingar læra av bretum, tá ið tað kemur til at fáa útlendingar at kenna seg vælkomnar í samfelagnum. Eisini verður Aberdeen nevnt sum dømi um, hvussu góða ávirkan eitt stórt altjóða universitet hevði havt á føroyska samfelagið.

Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)
*Eg vildi gera okkurt annarleiðis enn at fara til Danmarkar. Eg vildi sleppa at læra enskt. Og eg vildi hava onkrar aðrar førleikar enn onnur, sum eru í Danmark.*

Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London
*Tað virkaði eitt sindur meira útfordrandi og meira krevjandi at fara til London enn at fara til Danmarkar. Mær hevur altíð dámt væl enska málið. (...). Eitt annað var, at universitetini her eru viðurkend í øllum heiminum.*

Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen

*Eg havi ongantíð ætlað mær til Danmarkar at lisið, men eg havi ætlað mær at lisið. Og eg havi altíð hugsað um Bretland heldur enn Danmark, tí eg haldi tað er okkurt við mentanini her. Havi onkra familju í Onglandi...og vit høvdu BBC í sjónvarpinum fyrr og...hugdi nakað eftir tí...havi tímað væl enskt. Lisið enskar bøkur frá mann var lítil (...). So tað var kanska serliga málið og mentanin, sum vóru meira tiltalandi enn tað danska.*

Maður, 26, júst útbúgvin, 5. árið í Aberdeen

*Tá eg byrjaði at hugsa um at lesa, tá hugsaði eg at fáa tvær flugur við einum smekki. At fáa málið. (...). Tað var meira ella minni fastlagt at tað skuldi vera Bretland...eftirsum tað er so nær. Eg veit ikki um eg hevði tíma alt for langt, tí tað hevði verið dýrt. Og sjálvandi eisini tað, at tá var tað kortsíðani komið hetta við, at teir stuðla tær upp til 120.000. Og áðrenn máttu fólk betala og alt tað. Tað var eg slett ikki intresseraður í. So hevði eg farið til Danmarkar, heilt sikkurt, hevði tað ikki verið. Vissi eg hevði skulað betalt hvørt ár eini 40-50.000 og tá eg hevði verið liðugur við útbúgvingina, skylda eini 3-400.000. Tað hevði eg slett ikki tímað. So eg valdi Bretland, eftirsum at eg kundi fáa stuðul.*

Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London

*Orsøkin til, at eg valdi akkurát London er, at eg føldi meg heima beinan vegin her. Altso, tá eg vaks upp í Føroyum, tá var tankin altíð onkra aðrastaðni. Tá eg so bleiv okkurt um 16 kom MTV til Føroyar, sum gratis kanal. Tað var ein stór inspiratiónskelda til mín...at síggja hvat skeddi aðrastaðni. (...) Eg visti líka sum aftan fyri onkra staðni, at tað var her, eg fór at vera.*

Maður, 29, lesandi, 5. árið í London

*Tað var soleiðis, at tá ið eg einaferð kom hendan vegin...at ein býur sum London er ein góð avbjóðing. Tað var nakað, sum eg vildi upprunaliga. Eisini tá mann hevur áhuga í at fáa sær útbúgvingina her og praktisera her...tað gevur nakað eyka, tí at tað er London. Tað er líka sum eitt heilt serligt stað.*

Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London

*Eg búgvi í London, og tað er ikki akkurát tað sama sum at búgva aðrastaðni í Bretlandi. Hetta er ein mega stórur býur (...) og mær dámar væl, tí at tað er ógvuliga internationalt. Fólk koma allastaðni frá.*

Maður, 30, lesandi, 5. árið í London

*Eg haldi, tað er øðiliga lætt, at kenna seg heima her, tí at meginparturin av fólkunum, sum búgva her [í London], eru innflytarar. Men tað er altíð deiligt at koma heimaftur [til Føroya]. Legg merki til at eg sigi enn "heimaftur" um Føroyar. (...) men tað er eitt sindur soleiðis, at tá eg eri heima í ein mánaða ella tríggjar mánaðar, tá vil eg altso gjarna sleppa avstað aftur til London. So eg haldi, at eg kenni meg heima her, so nógv sum ein føroyingur nú einaferð kann.*

Maður, 26, júst útbúgvin, 5. árið í Aberdeen
*Eg kenni meg heima her...men hvørja ferð eg havi verið her í einar tveir mánaðir, tá leingist mann eitt sindur aftur til Føroya. Og tá ið eg eri í Føroyum og havi verið har í ein, tveir mánaðir, so leingist mann aftur hertil. So mann hevur akkurát sum tvey heim. Mann er eitt sindur splittaður, men ikki uppá ein negativan máta. Eg haldi faktiskt uppá ein positivan máta. At vissi eg bara var í Føroyum, so hevði eg gingið glipp av nøkrum. Og vissi eg bara hevði verið her, so hevði eg følt, at so manglar okkurt, tí at eg føli ikki, at alt er her.*

Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London
*Eg haldi, at eg komi í samband við næstan alt slag av fólkaslagi. Eg arbeiði saman við italienarum. Havi vinkonur frá Australia, Englandi og Suður Afrika… ja allastaðni frá. Eg fáist eisini við fólk sum eru allastaðni frá. (...). Uttan mann hevur hugsað um tað, so hevur mann ígjøgnum dagin tosað við so nógvar mentanir.*

Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen
*Eg haldi, at vit í Føroyum kunnu læra av teimum. Til dømis, tá tað kemur til at integrera fólk og sovorðið. Tað hevur eydnast væl her. Útlendingar í Aberdeen og...universitetið í Aberdeen, haldi eg, riggar nokkso væl sum dømi uppá, hvat tað kann vera í Føroyum. Onkur hevur tosað um eitt stórt universitet einaferð, og hvør skal ganga har. Her eru eini 20.000 meir í býnum, tá ið fólk ikki eru í feriu. Og ræðuliga nógvir útlendingar, sum føla seg vælkomnan her. Tað er gott fyri vinnurnar í økinum. Møguleikar av øllum møguligum slag. Og at fáa nýggjar heilar til virkini her.*

Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen
*Bretar eru meira fólkaligir og blíðir enn føroyingar. Tey eru meira opin yvirfyri fremmandum fólkum. Tú sitir ikki og følir teg illa, í hvussu er eg, tá ið tú sitir í einum tíma og roynir at úttrykkja teg. Sjálvt um tú ongantíð kemur at tosa líka væl sum tey. Tú følir teg yvirorðnað øðiliga væl, haldi eg. Eg veit ikki, um tað er tí, at tey eru von at hava fólk, sum ikki tosa øðiliga væl enskt. Tey eru von við at hava nógv onnur fólkasløg og sovorðið inni. (...) tað er í hvussu er eitt inntrykk, sum mann fær øðiliga skjótt.*

## 4.2. Samband við Føroyar og føroyingar

Tað er serliga viðvíkjandi sambandi við aðrar føroyingar, at tað er munur á útisetum í Aberdeen og teimum búsitandi í London. Tey, sum búgva í Aberdeen, siga seg hava sera nógv samband við aðrar føroyingar í býnum; nóg nógv til at tey hava fingið fleiri nýggj føroysk vinfólk undir uppihaldinum í Bretlandi, meðan Londonbúgvarnar siga seg hava minni samband við aðrar føroyingar. Viðvíkjandi vitjan til Føroya leggja luttakararnir serliga dent á, at ferðaseðlarnir áttu at verið bíligari.

Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen
*Tað, at tað eru so nógvir føroyingar her, ger, at mann følir seg eyka føroyskan og heima og tryggan og ikki so langt heimanífrá. Og ger tað, at mann kanska hugsar um at flyta heimaftur, tí at mann tosar føroyskt allatíð og kemur saman við føroyingum.*

Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen
*Her hevur verið øðiliga gott at verið, men tað hevur kanska okkurt við tað at gera, at her eru nógvir føroyingar, og at eg kom skjótt inn í ein bólk av fólkum...av føroyingum. Og at mann kom at kennast, faktiskt bara tí mann var føroyingur. Og nú hevur mann fingið fleiri ordiliga góðar vinir. Eisini valdi eg at búgva á kollegii, og har kom eg at kenna nógv fólk her frá. Tað helt eg vera ordiliga positivt. At koma inn í mentanina ordiliga. Og skúlan kann eg eisini bara siga gott um allan vegin ígjøgnum. Her er øðiliga annarleiðis enn í Føroyum, men eg haldi gott, at tað, sum er øðrvísi, kann vera gott.*

Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London
*Eg síggi føroyingar her niðri við hvørt. Altso, eg royni ikki at síggja føroyingar fyri at síggja føroyingar, ella tosa føroyskt. Tað, at tosa heim, uppfyllir alt hatta har sum so. Men serliga í fyrstani, tá einki samband var, so hevur tað hjálpt mær at 100 prosent integrera meg her yviri, uttan at leita eftir sikkurheitsnetum (...) tað er ein sosial hending [tá ið føroyingar hittast], tí at mann er blivin eldri, og tað er stuttligt at síggja fólk og vita hvat sker. Kanska tey hava meira informatiónir um hvat sker heima, enn mann sjálvur hevur.*

Maður, 29, lesandi, 5. árið í London
*Seinastu trý árini havi eg verið eina ferð um árið í Føroyum, altso um summarið. Tað er minimum eina ferð, ella kanska tvær ferðir, um jólini. Tað kostar at koma heim. (...). Altso, vissi eg skuldi búð her beint og farið heim tvær ferðir um árið, so hevði eg ikki farið nakra aðrastaðni, so tað er nøkulunda. So, eg trúgvi eina ferð um árið er realistiskt.*

Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London
*Eg plagi at fara heim tvær ferðir um árið. (...). Eg hevði ógvuliga gjarna vilja sæð bilettirnar blivið bíligari, so mann hevði kunna farið heim oftari. Ikki bara fyri at síggja familju og vinir oftari, men eisini fyri tað vinnuliga og fáa møguleikar har og halda tað við líka. Tað er fullkomuliga absurt, tí at eg kann fara til Morokko ella longur fyri sama prís.*

## **4.3. Hugburður til føroyska samfelagið**

Samrøðurnar avdúkað eitt gjøgnumgangandi tvílyndi í útisetunum viðvíkjandi føroyska samfelagnum. Flestu av luttakarunum leggja út við positivum viðmerkingum, men viðganga stutt aftaná at vera misnøgd og onkuntíð beinleiðis ørg inn á ymiskt við føroyska samfelagnum. Positivu viðmerkingarnar eru ofta kenslubornar og bera onkuntíð brá av

einum longsli eftir farnari tíð. Sagt verður, at Føroyar fara altíð at vera heimið, og at bæði familja, vinir, føroyska náttúran og annað gera sítt til at varðveita eitt heldur ógreinandi tilknýti, sum liggur í øllum føroyingum. Føroyar vera eisini sagdar at vera tryggar og avstressandi í mun til onnur lond.

Hóast útisetarnir búgva í býum, sum hava eina mongd av frítíðartilboðum, lata nøkur av teimum sera væl at frítíðarmøguleikum í Føroyum. Millum annað verður sagt, at í Føroyum eru nógvir av frítíðarmøguleikunum ókeypis, til dømis ymiskt, sum ein kann takast við í náttúruni, og at hetta er ein stórur fyrimunur. Eisini verður nevnt, at teir frítíðarmøguleikar, sum kosta pening (bowling, biograf o.s.fr.), eru betraðir seinastu árini. Munurin á frítíðar-møguleikum í eitt nú London og í Føroyum er, at tað ber betri til at vera kreativur í Føroyum, meðan í London er "óendaligt serverað á einum fati, fyri ein pening", sum ein tekur til. Til seinast verður nevnt, at tað er sjáldan, at ein skal ferðast leingi í Føroyum, og tí er tað skjótari og lættari at fáa gagn av frítíðarmøguleikunum, hóast hesir ikki eru so nógvir í tali.

Ein av útisetunum hevur positiva fatan av starvsmøguleikum í Føroyum. Hon sigur seg hava hoyrt um størv í Føroyum, sum ljóða spennandi, og sum hon hevði havt hug at roynt.

Hinvegin eru fleiri útisetar, sum hava eina verri fatan av starvsmøguleikum í Føroyum. Hesir vilja vera við, at føroyski arbeiðsmarknaðurin er heldur avmarkaður og hevur ov lítið at bjóða fólki við ávísum hægri útbúgvingum (hetta koma vit aftur til í 4.6. Framtíðarætlanir). Eisini verður nevnt, at føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur ov lítið av vitan og manglandi perspektiv viðvíkjandi útbúgvingum tiknar uttanfyri Danmark.

Í samanbering við Bretland verður sagt, at har er ein anti-intellektualisma í Føroyum, sum ger samfelagið minni áhugavert enn tað bretska.

Eisini verður sagt, at føroyska samfelagið er ov konservativt. Her vera dømi tikin, bæði í sambandi við avoldaðar rúsdrekka- og heilidagslógir, manglandi vilja til at fremja aðrar vinnur enn fiskivinnuna, manglandi áhuga fyri at fáa útlendska arbeiðmegi til landi, snævurskygda tankagongd viðvíkjandi øðrum mentanum og tað, at politisk mál vera viðgjørd út frá persónligum átrúnaðarligum sjónarmiðum.

<u>Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)</u>

*Eg kenni meg mest heima, tá ið eg eri í Føroyum. Tað kemur sjálvandi av tí, at mann er føddur og uppvaksin í Føroyum. Mann hevur sína familju. Mann hevur eitt heim at koma heim til. Mann hevur eitt kamar. Tú hevur tínar vinir. Og tað, at tey tingini, sum definera ein føroying, eru tættari við. Tað, at tú hevur føroyskan mat og føroyska mentan, tað, sum tú kallar føroyska mentan. Tað liggur mær øðiliga nær.*

<u>Maður, 30, lesandi, 5. árið í London</u>
*Eg haldi at Føroyar altíð verður heimið. Tað haldi eg. Eg haldi at tá mann...ja onkuntíð hevur mann hug at blíva eitt sindur romantiskur um tað, men tað er eitt ella annað við at har eru nøkur bond, sum ongantíð koma at slítast. Tað er hatta har við náttúruni og at vera umringaður av fjøllum og havi. Eg trúgvi, tað fer ongantíð úr einum føroyingi. Mann hoyrir ofta um familjur sum eru fluttar til Danmarkar, sum flyta heimaftur aftaná 10-20 ár. Har er eitt ella annað, sum knýtir okkum at Føroyum.*

<u>Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London</u>
*Hasin tryggleikin heima er so avstressandi. Eg veit, at tað eru fólk heima, sum eru stressaði av at arbeiða, men eg rokni við, at tað má vera eitt av teimum minst stressandi støðunum í verðini, í hvørt fall um familjusystemið hjá tær fungerar, og vissi tú hevur nóg nógv at gera í frítíðini. Jú eldri eg blívi, jú meira hugsi eg um tað.*

<u>Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London</u>
*Tá mann kemur heim til Føroyar, so kemur mann oftani við tí í høvdinum, at mann er útlendingur sjálvur, tí at mann setur meira virði á náttúruna; tað er eitt stórt luksus, tá mann kemur heim. At mann bara kann fara ein gongutúr niðan í hagan ella Svartafoss. Tað, í sær sjálvum, kann vera eitt upplivilsi fyri meg, og so hugsar mann um møguleikarnar, um tað var ein útlendingur, sum aldrin hevur verið í Føroyum fyrr, hvussu nógv mann hevur at bjóða uppá, uttan at mann skal keypa seg til tað. Meðan her [í London] er óendaligt servera á einum fati, fyri ein pening.*

<u>Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London</u>
*Eg haldi, at tað er massar av frítíðarmøguleikum í Føroyum. Eg gekk til dans, eg spældi við einum jazz horkestri, sang kór og so víðari. Eg haldi, at møguleikarnir at vera kreativur, og skapa nakað eru nógv størri í Føroyum enn nógva aðrastaðni. Her [London] er nógv ting at fara til og síggja, men øgiliga passivir frítíðarmøguleikar. (...). Eisini møguleikar hjá børnum í ítrótti og sovorðið nakað. Um mann vil nakað øðiliga spesifikt, so er tað kanska ringt [í Føroyum]. Um mann vil, so finnur mann okkurt, og mann hevur nógv meira tíð. Tað eru so stórir avstandir í stórbýnum, meðan í Føroyum er tað nógv tættari.*

<u>Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen</u>
*Eg haldi, at har eru góðir møguleikar [at finna starv]. Eg havi spurt meg fyri hjá øðrum, sum arbeiða í Føroyum, og eg haldi har eru ordiliga nógv spennandi arbeiði, sum eg hevði tímað ordiliga væl.*

<u>Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (2)</u>
*Mítt indtryk er, at mann má redusera seg sjálvan eitt sindur, um mann vil arbeiða í Føroyum. Um tú kemur til Føroya við einum Ph.D. í til dømis biologi, so eru tað eini fimm arbeiðspláss, sum tú kanst fara í. (...). Tað eru ikki verðins mest avbjóðandi størv í Føroyum. Tað eru ikki serliga nógv størv, sum passa til hægri akademiskar útbúgvingar. (...) tær resursir og teir førleikar, sum tú hevur útviklað við at gera eina Ph.D. í fleiri ár, teir vera ikki brúktir til fulnar, tað haldi eg ikki. Tú livir ongantíð ordiliga upp til potentialið, sum tú hevur. Tað er mítt indtryk.*

<u>Maður, 29, lesandi, 5. árið í London</u>
*Uttan at tað verður for negativt, so eru Føroyar eitt ræðuliga lítið land og tað er nokkso avmarkað, óansæð hvørja vinnugrein tú hevur. (...). Har eru ikki so nógvar avbjóðingar, arbeiðsmøguleikar og hvat tú hevur møguleika fyri at tjena og hvat tú hevur møguleikar fyri at gera yvirhøvur. Tað er ein øðiliga vigtigur postur hjá mær.*

<u>Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen</u>
*Har er eitt sindur av manglandi vitan og perspektivering í Føroyum, tá ið tað kemur til útbúgving, tí tá ið tú hyggur at lýsingum til størv í tí almenna...tey søkja ofta eftir fólkum við donskum heiti, altso cand. mag. ella cand. mag. psych. Tað fær teg at hugsa eitt sindur um, hví tað er...hví hatta enn er so avmarkað, tá ið tað eru so nógv, sum lesa aðrastaðni enn niðri. (...). Mann følir seg eitt sindur fremmandagjørdan.*

<u>Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (2)</u>
*Tað er nógv meira interessant at fylgja við í samfelagnum í Bretlandi enn í Føroyum. Tíðindi eru nokkso inconsequential [ikki týðandi] í Føroyum. (...). Og tað henda meiri ting her. Samfelagið er bara uppá onkran máta meira interessant enn í Føroyum. Og her er ein nógv sterkari tradisjón fyri intellektualismu. Altso, tað eru klók fólk, sum sleppa framat í miðlunum og alt tað. (...). Eg haldi tað er orsakað av eini anti-intellektualismu í Føroyum...eini anti-elitismu. Tú skalt ikki koma her og siga nakað. Eitt slag av jantelóg. Tað hevur tú ikki her uppá sama máta.*

<u>Maður, 30, lesandi, 5. árið í London</u>
*Har er nógv í Føroyum, sum fáa meg at hugsa "lat meg sleppa vekk herfrá". Til dømis, tá ið politikkur blívir...politisk mál blíva viðgjørd útfrá persónligum religiøsum sjónarmiðum, tá hoppi eg av. Tá hugsi eg: "altso, eg tími ikki at búgva her". Tað er eitt sum ger at...eitt av høvuðsmálunum sum ger, at eg ivist í um eg nakrantíð...altso sjálvt um eg flyti aftur til Føroya, so veit eg ikki hvussu leingi tað verður, tí eg klári ikki sovorðið. Tað er eisini eitt, sum er hent nú, tá eg eri fluttur til London. Mann er bevístur um, at mann kanska vil seta nøkur krøv til tað samfelagið, mann býr í. Ístaðin fyri at tá eg búði í Føroyum, tá var tað bara: "soleiðis er tað bara".*

<u>Maður, 29, lesandi, 5. árið í London</u>

*Altso, eg haldi at føroyska samfelagið hevur brúk fyri øllum kreftum. Serliga fólki við hægri útbúgvingum. Tí eftir mínari meting, so eru føroyingar lutfallsliga, nú sigi eg lutfallsliga, vælútbúnir. (...) men tað eru ikki so nógvar heilar akademiskar útbúgvingar. Eg haldi føroyingar hava stóran tørv á fólki við hægri lesnaði. Bæði innan fyri almannaverkið, tað politiska og so víðari.*

## 4.4. Samleikakenslur

Samleiki er viðkvæmur, tí hann broytist hvørja ferð hann kemur í samband við mentanarligar ávirkanir. Tí er tað ein stór broyting, sum fer fram, tá ið ein, sum hevur búð tað mesta av sínum lívi í Føroyum, leitar sær aðrastaðni at búgva. Ein av luttakarunum umtalaði sín samleika sum 'gypsy', fyri tað fyrsta, tí at hon, sum Londonbúgvi bara er ein av fleiri milliónum av øðrum útlendingum í býnum, og eisini tí at hon kennir tað, sum at samleikin altíð er í broyting nevniliga orsakað av regluliga sambandinum, sum hon hevur við nógvar ymiskar mentanir.

Tó er greitt, at allir luttakararnir kenna seg fyrst og fremst sum føroyingar. Nøkur vilja vera við, at tjóðskaparkenslan økist, tá ið flutt verður uttanlands, meðan onnur siga, at tilknýtið til Føroyar er minkað, ella hevur broytt seg, síðani tey fluttu til Bretlands. Nógv bendir á, at ein norðurlendsk samleikakensla eisini ger seg galdandi, tá ið føroyingar flyta úr Føroyum. Sambært tveimum av luttakarunum var tað, tá ið teir komu til Bretlands og høvdu regluligt samband við ikki-føroyingar, at norðurlendska samleikakenslan kom fram. Tað kann tí hugsast, at norðurlendski samleikin er hentur, tá ið samskift verður við fólk, sum ikki vita nakað um Føroyar.

<u>Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)</u>
*Eg eri ein ordiligur føroyingur. Tjóðskaparkenslan blívir altíð nógv størri, tá ið mann fer uttanlands, haldi eg ofta, tí mann sær, hvat vit hava, og hvat vit ikki hava. Altso vansar og fyrimunir við at vera føroyingur. Hvussu heldig vit í veruleikanum eru í nógvum førum. Og eisini í nógvum førum, hvat tað er, sum ger, at vit ikki eru komin longri. Men eg føli meg sum ein ordiligan føroying. (...) eg síggi tað, at vit hava ein kultur, sum eg haldi er meira mennandi og gevandi enn tann skotski, altso okkara máti at liva uppá, har familjuvirðir hava nakað at siga.*

<u>Maður, 29, lesandi, 5. árið í London</u>
*Mín samleiki...jaja, tað er fullstendiga ótreytað føroyskt líka sum tað var áðrenn. Tað er eingin ivi um tað. (...) Tað er ikki nakað, sum eg hugsi serliga nógv um. Tað er ótreytað.*

Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London

*So skjótt eg flutti úr Føroyum, so fekk tað nógv størri týdning, tað at mann var føroyingur. (...) Eg vildi ikki sagt, at eg føli meg sum ein heimsborgara, tí tað er ein sovorðin kliché, og tað passar heldur ikki. (...). Tað hevur nakað at siga, at mann veksur upp í smáum forholdum. At familja hevur nógv at siga, at familjan er stór, og at mann kennir tey øll, sysknabørn, trímenningar, ommudid og abbadid. (...) Um eg fái børn, so hopi eg, at tey einaferð eisini kunnu vera eitt sindur føroysk. So eg vóni at kunna leggja nakað føroyskt í tey eisini.*

Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen

*Eg eri føroyingur og norðurlendingur ella skandinavi. Fyrst og fremst føroyingur og so norðurlendingur. Føli mest til felags við Ísland og Noreg og kanska Grønland uppá onkran máta. Eg kenni meg kanska eitt sindur av [bretskum] tilknýti, tá ið eg eri heima ella onkra aðrastaðni. Beint nú, tá ið eg eri her [í Aberdeen], tá føli eg meg ikki so bretska. (...) Mann blívir meira tjóðskaparsinnaður og føroyskur og sovorðið [av at vera uttanlands].*

Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)

*Hann [føroyski samleikin] er broyttur [undir uppihaldinum í Bretlandi], ja...hann er meira...ella sterkari. Eisini haldi eg sjálvur, at eg eri blivin meira...eg veit ikki um mann kann siga tað... meira skandinaviskur. Ella pro-skandinaviskur... og eg síggi skandinavar sum, altso... eg haldi, at tey eru komin nógv longur enn bretar sosialt og mentanarliga.*

Maður, 30, lesandi, 5. árið í London

*Tá eg vaks upp í Føroyum, sum smádrongur, so sá eg meg ongantíð sum føroying. Eg var ein av hesum í MTV generatiónini. Eg sá meg sum ein evropeara heldur enn ein føroying. Ella tað vildi eg gjarna síggja meg sjálvan sum. Tá eg so flutti til London, fann eg útav, at tað var faktiskt ikki heilt rætt. Eg eri ikki so nógv evropeari. Eg eri heldur ein skandinavi...meiri enn nakað annað. So vissi onkur spyr meg, so haldi eg, at tað er nokk tað, eg fyrst vildi fortalt teimum, og síðani tað at eg var úr Føroyum. Men vónandi broytist samleikin so við og við, tá ið mann flytir til nýggj støð. Annars hevur mann misskilt eitt ella annað. Men eg trúgvi ikki, at øll gera tað. Summi koma her, og halda bara saman við sínum egnu landsmonnum uttan nakrantíð ordiliga at læra enskt. So eg trúgvi, at mann kann gott flyta til London, uttan at samleikin broytist, men eg...tað er stór synd um tað hendir. At halda krampaktigt í nøkrum, tað...altso samleiki skal heldur ikki vera ein religión...tað skal vera hampiliga dynamiskt vildi eg trúð.*

### 4.5. Framtíðarætlanir

Nakað, sum eyðkendi allar samrøðuluttakararnir var, at eingin hevði tikið endaliga avgerð, um flytast skal til Føroya í nærmastu framtíð ella ikki. Allir søgdu seg hava hug til at flyta

heimaftur, men nógvir av teimum nevndu eina ella fleiri orsøkir til, at hetta møguliga ikki fór at bera til.

Tað, sum nøkur løgdu dent á var, at møguleikarnir at fáa eitt gott starv í Føroyum er alt avgerandi fyri, um tey nakrantíð flyta heimaftur. Summi av hesum hava útbúgvingar, sum tey ikki vænta kunnu brúkast í Føroyum (til dømis útbúgvingar innanfyri teologi ella bretska lóg) og tí søgdu tey, at útlitini fyri at flyta heimaftur ikki vóru serliga góð. Fleiri nevndu, at hóast tey ætla sær heimaftur, so verður hetta seinni, til dømis tá ið tey hava fingið arbeiðsroyndir, roynt seg í øðrum landi ella tá ið tey fara at fáa børn.

Tað er ikki møguligt at skráseta parlag í Føroyum, og hetta heldur ein samkyndur útiseti vera ov galið. Hon sigur seg hava hug at búgva í Føroyum, men at hetta ikki er møguligt, tí hon er gift við kvinnu frá Suðuramerika, sum ikki kann fáa uppihaldsloyvi í Føroyum. Lagt var afturat, at tað er ikki kann vera rætt, at tær kunnu flyta saman til Danmarkar, men ikki til Føroya.

Samanumtikið var hugurin at flyta til Føroya góður, hóast fleiri sóu tað sum órealistiskt at flyta heimaftur í nærmastu framtíð. Tó viðgingu teir flestu av útisetunum, at um starvið er tað rætta, og um samfelagið samstundis gerst meira lokkandi uppá aðrar mátar, so er møguleikin altíð til staðar.

<u>Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (2)</u>
*Sjálvandi eg leingist til Føroya, tí tað er har mann...tað er har tað primera heimið uppá ein máta er. Men eg føli, at tað [tilknýtið til Føroyar] minkar eitt sindur. Tá ið eg hugsi um, hvat fari eg at gera í framtíðini. Tað verður allarhelst ikki í Føroyum. Kanska, men tað er líka stórur kjansur, um ikki størri kjansur, at eg verði uttanlands, í Bretlandi ella onkra aðrastaðni. Kanska hevur tað okkurt við tann kensluliga innstillingin at... eg fari sikkurt at vera her. Eg havi verið her leingi, og eg fari at vera her í nøkur ár afturat. (...) tað hevur nógv við tað professionella at gera. Um eg skal arbeiða við tí, sum eg havi lisið.*

<u>Maður, 30, lesandi, 5. árið í London</u>
*Tað hevði kanska verið ein sjarma at farið heim í eitt ár av og á. Men vissi eg fari heim, so er tað ikki permanent. Um eg vendi heim seinni, tað veit eg ikki. Men eg haldi ikki, at eg tími hatta við at leggja endaligar ætlanir um, hvar eg vil búgva permanent. Tað dugi eg ikki at síggja nakra grund til longur. Og um eg skal heimaftur at arbeiða permanent í Føroyum, so skal tað vera á einum góðum arbeiðsplássi. Tað er heilt sikkurt. Eg síggi tað eitt sindur sum, at mann ofrar eitt sindur við at fara heimaftur, og eg skal hava eitt sindur afturfyri. Tað vil siga at arbeiðsplássið skal vera gott, og tað skal vera góð løn og so víðari.*

Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen

*Eg haldi faktiskt, at um eg hevði fingið okkurt gott starv, at eg heilt sikkurt hevði viljað sloppið at roynt at búð í Føroyum. Men eg hevði ikki farið heim, um tað ikki var eitt ordiliga gott arbeiði.*

## 5. Kjak og niðurstøður

Tað, sum serliga eyðkennir luttakararnir í hesi kanning, er, at nógvir av teimum eru ungir – teir allarflestu eru yngri enn 30 ár – og ein sera stórur partur er lesandi. Sera fá av hesum fólkum hava tikið endaliga avgerð um, hvat tey ætla at gera, og hvar tey ætla at búgva, í nærmastu framtíð. Ein leysligur og flótandi hugburður viðvíkjandi framtíðarætlanum er sostatt nakað, sum, sambært kanningini, eyðkennir ungar føroyskar útisetar.

Nógvir av útisetunum, sum antin eru lesandi ella hava lisið í Bretlandi, siga seg ikki útihýsa, at teir høvdu tikið útbúgvingina í Føroyum, um hetta var møguligt. Hetta er viðkomandi, tí seinastu árini hevur nógv prát verið, um økjast skal um útboðið av hægri útbúgvingum í Føroyum. Hinvegin vóru tað fleiri, sum søgdu, at tey ikki høvdu tikið útbúgvingina í Føroyum, um møguleikin var til staðar.

Tað, at útisetarnir tykjast at hava eitt ynski um at búgva uttanfyri Føroyar, í minsta lagi meðan teir lesa, er nakað, sum endurspeglar ein vaksandi kosmopolitiskan hugburð millum ung í vesturheiminum. Sum áður nevnt, eru tað nógv, sum flyta til Bretlands við ynskinum um at royna okkurt nýtt. Eisini síggja vit, at fólk hava sera lætt við at finna seg til rættis og trívast í øðrum landi, enn tey eru uppvaksin. Bæði kvantitativa og kvalitativa kanningin geva ábendingar um, at føroyingar ikki bara klára seg í Bretlandi, men eisini at nógv av teimum stórtrívast. Lagt var til merkis, at teir útisetar, sum hava búð í Bretlandi í fleiri ár, siga seg hava sterkari tilknýti til bretska samfelagið enn teir, sum hava búð har í stutta tíð. Hetta líkist í stóran mun einari av niðurstøðunum hjá NAB, sum var, at útisetar í Danmark fáa sterkari tilknýti, jú longri teir vera verandi.

Sosiala umhvørvið hevur óivað stóra ávirkan á trivnaðin hjá útisetunum. Flestu av luttakararnum siga seg hava samband við aðrar føroyingar í minsta lagi eina ferð um vikuna. Samstundis eru tað fleiri, sum eru saman við ikki-føroyskum vinfólkum meira enn við føroyskum vinfólkum. Hetta er áhugavert og kann hugsast at endurspegla tað, at flestu av útisetunum eru í einum lestrarumhvørvi, har frítíðartilboð og møguleikar at hitta fólk á sama aldri eru nógv/ir.

Hugburðurin hjá útisetum er merktur av tvílyndi, tí teir síggja bæði fyrimunir og vansar við at búgva í Føroyum. Sum heild vera Føroyar hildnar at vera eitt lokkandi stað at búgva fyri tey, sum leggja stóran dent á familju, og minni lokkandi fyri tey, sum eru framsøkin viðvíkjandi

yrkisleið. Kvantitativa kanningin vísir, at luttakararnir halda Føroyar vera eitt gott stað at uppdraga børn og síggja eisini týdningin av samanhaldi við familju og vinum har heima. Samstundis halda tey, at starvsmøguleikar ikki eru nøktandi. Kvalitativa kanningin gevur ábendingar um tað sama: Føroyar eru sum heild eitt familju- og barnavinarligt samfelag, men samstundis eru starvsmøguleikarnir avmarkaðir ella beinleiðis vánaligir. Fyri summi verður tað, at flyta heimaftur, hildið at vera eitt afturstig á yrkisleiðini. Fatanin av føroyska arbeiðsmarknaðinum tykist sostatt at vera, at hann er tryggur men ikki spennandi.

Tó er vert at nevna, at heilir tveir triðingar av luttakarunum, sum søgdu, at fakligar avbjóðingar í Føroyum vanta, søgdu seg eisini vilja vera við til at skapa framgongd í Føroyum. Tað er avmarkað, hvørjar niðurstøður ein kann gera burturúr hesum, men tað kann hugsast, at hugburðurin hjá nógvum útisetum er, at um føroyski arbeiðsmarknaðinum gerst meiri lokkandi, so ber til at fáa tvey ynski uppfylt samstundis: Spennandi starv *og* møguleika at menna føroyska samfelagið.

Hóast starvsmøguleikar vigaðu mest fyri luttakararnar, vóru tað eisini onnur mál, ið høvdu týdning. Kvantitativa kanningin vísir, at tað eru trý mál, umframt starvsmøguleikar, sum útisetarnir eru serliga misnøgdir við, og sum hava stóra ávirkan á avgerðina um bústað í framtíðini. Hesi eru, at samfelagið er konservativt, at ferðasamband til og úr Føroyum er ov vánaligt, og at bústaðarviðurskifti ikki eru nøktandi. Kvalitativa kanningin gevur meira ítøkiligar ábendingar um, hvat útisetar eru misnøgdir við. Tað, sum fekk flest atfinningar undir samrøðunum var, at samfelagið er stirvið og konservativt. Nevnt var, til dømis, at rúsdrekka- og heilidagslógirnar er avoldaðar, at politikkarar eru ov upptiknir av fiskivinnu og mangla vilja til at fáa nýggjar vinnur upp at standa og at bæði føroyskur politikkur er ov nógv merktur av átrúnaði. Tá ið tað kemur til ferðasamband, eru tað serliga dýru flogferðaseðlarnir, sum fólk hava ampa av. Tílíkar atfinningar mugu takast í álvara, tí tað kann hugsast, at manglandi nøgdsemi hjá útisetum viðvíkjandi ávísum málum er orsøk til, at hesir kenna seg fremmandagjørdar og kunnu soleiðis fáa minni hug at búgva í Føroyum í framtíðini.

Útisetar í Bretlandi kenna seg fyrst og fremst sum føroyingar. Umleið triði hvør av teimum kennir seg eisini sterkt sum norðurlending, meðan umleið fimti hvør sigur seg hava eina sterka kenslu av at vera heimsborgari. Greitt er, at hóast summi siga seg hava aðrar samleikar enn tann føroyska, so broytir hetta sera lítið (um nakað) uppá føroysku

samleikakensluna, sum í flestu førum verður verandi líka sterk sum áður. Kvalitativa kanningin gav ábendingar um, at norðurlendski samleikin kemur fram, tá ið ein flytir uttanlands. Orsøkin til hetta kann hugsast at vera, at ein samleiki, sum umboðar nakað størri og kendari enn Føroyar, er góður at hava, tá ið ein regluliga samskiftir við fólk, ið ikki kenna Føroyar.

Føroyska samleikakenslan er sterk hjá allarflestu av útisetunum, men hetta ikki takast sum tekin um, at teir ætla sær at flyta heimaftur, hóast ein stórur partur av teimum ikki útihýsir møguleikanum. Nógvir siga seg onkuntíð hugsa um at flyta heimaftur, meðan umleið fimti hvør hugsar um tað ofta. Vert er at nevna, at flestu útisetarnir halda tað vera meira sannlíkt at búgva í Føroyum enn í øðrum landi (Bretland íroknað) í framtíðini, men, sum áður nevnt, eru sera fá, sum vita við vissu, hvat framtíðin hjá teimum inniber.

Líkt er til, at talið av útisetum, í Bretlandi og aðrastaðni, fer at vaksa í framtíðini. Nøkur av hesum fara óivað at flyta heimaftur eftir nøkur ár, meðan hjá øðrum eru Føroyar ikki partur av framtíðarætlanunum. Loysnin uppá trupulleikarnir viðvíkjandi hugburðinum hjá útisetum mótvegis føroyska samfelagnum, og harvið manglandi huginum hjá teimum at flyta heimaftur, eru ikki einfaldar. Til tess at betra um møguleikan, at hesir førleikar í útlegd kunnu koma samfelagnum til góðar seinni, er tað umráðandi, at ein veruligur útisetapolitikkur verður orðaður, sum inniber eitt meira umfatandi samskifti við útisetar og eina áhaldandi dagføring av vitan okkara um føroyingar búsitandi uttanlands.

# 6. Fylgiskjøl

## 6.1. Myndir frá kvantitativu kanninginí










*Viðm.: Møguleiki var at velja fleiri svar.*




*Viðm.: Møguleiki var at velja fleiri svar.*






*Viðm.: Møguleiki var at velja fleiri svar.*




*Viðm.: Møguleiki var at velja fleiri svar.*







*Viðm.: Av teimum 120 luttakarunum eru 75 í ferð við útbúgving, meðan 35 hava fyrr lokið útbúgving í Bretlandi. Hesir báðir bólkar falla tó saman, tí summir luttakarar kunnu bæði vera lidnir við eina og í ferð við aðra útbúgving (til dømis við 1-ára MA/MSc útbúgving, sum eru vanligar í Bretlandi). Sostatt kann talan vera um minni enn 110 (75+35) persónar tilsamans.*




*Viðm.: Av teimum 120 luttakarunum eru 75 í ferð við útbúgving, meðan 35 hava fyrr lokið útbúgving í Bretlandi. Hesir báðir bólkar falla tó saman, tí summir luttakarar kunnu bæði vera lidnir við eina og í ferð við aðra útbúgving (til dømis við 1-ára MA/MSc útbúgving, sum eru vanligar í Bretlandi). Sostatt kann talan vera um minni enn 110 (75+35) persónar tilsamans.*




*Viðm.: Av teimum 120 luttakarunum eru 75 í ferð við útbúgving, meðan 35 hava fyrr lokið útbúgving í Bretlandi. Hesir báðir bólkar falla tó saman, tí summir luttakarar kunnu bæði vera lidnir við eina og í ferð við aðra útbúgving (til dømis við 1-ára MA/MSc útbúgving, sum eru vanligar í Bretlandi). Sostatt kann talan vera um minni enn 110 (75+35) persónar tilsamans.*


Mynd 12: Hvussu langt lesandi útisetar eru komnir við síni útbúgving (N=75)
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
Á 1. ári
Á 2. ári
Á 3. ári
Á 4. ári
Á 5. ári
Á 6. ári ella longri


Mynd 13: Fulltíðar arbeiðandi útisetar skiftir á slag av arbeiði (N=24)
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Sjálvstøðug vinnurekandi
Faklært arbeiði
Ófaklært arbeiði
Arbeiði sum krevur hægri útbúgving
Annað


Mynd 14: Fulltíðar arbeiðandi útisetar skiftir á almenna og privata arbeiðsmarknaðin (N=24)
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Almenna
Privata


Mynd 15: Fulltíðar arbeiðandi útisetar skiftir á árliga inntøku (áðrenn skatt og frádrøg) (N=24)
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
£0-£9.999
£10.000-£19.999
£20.000-£29.999
£30.000-£39.999
£40.000-£49.999
Meira enn £50.000


Mynd 16: Fulltíðar arbeiðandi útisetar skiftir á seinasta útbúgvingarprógv (N=24)
80%
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Færri enn 9 ára skúlagongd
Fráfaringarroynd Fólkaskúlans
Miðnámsskúlaprógv
Lærlingaprógv
Universitetsprógv
Annað


Mynd 17: Hvussu útisetar trívast í Bretlandi (N=120)
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Illa
Nøkulunda
Væl
Sera væl


Mynd 18: Tilknýti til Bretland (bretar, bretskari mentan og/ella annað) (N=120)
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Einki tilknýti
Nakað av tilknýti
Sterkt tilknýti
Sera sterkt tilknýti


Mynd 19: Tilknýti til Bretland í mun til longd á uppihaldi (N=120)
Einki tilknýti
Nakað av tilknýti
Sterkt tilknýti
Sera sterkt tilknýti
100%
80%
60%
40%
20%
0%
Minni enn 1 ár (N=26)
1 ár (N=16)
2 ár (N=20)
3 ár (N=16)
4 ár (N=14)
5 ár (N=8)
6-10 ár (N=10)
11 ár ella longri (N=10)


Mynd 20: Hvussu ofta útisetar eru saman við vinfólki, sum ikki eru føroyingar (N=120)
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Ongantíð
Sjáldan
Hvønn mánaða
Hvørja viku
Hvønn dag


Mynd 21: Hjúnarstøða (N=120)
50%
45%
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
Gift
Støk
Annað


Mynd 22: Barnaviðurskifti (N=120)
90%
80%
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Eiga børn
Eiga ikki børn


Mynd 23: Áhugi í føroyskum politikki (N=120)
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Ongan áhuga
Nakað av áhuga
Stóran áhuga
Sera stóran áhuga


Mynd 24: Vallutøka til kommunu- og/ella løgtingsval (N=109)
80%
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Hava valt
Hava ikki valt
Høvdu ikki valrætt


Mynd 25: Føroyar skulu gerast limur í ES. (N=120)
45%
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
Sera samd
Samd
Ivandi
Ósamd
Sera ósamd


Mynd 26: Føroyar skulu hava fullveldi. (N=120)
45%
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
Sera samd
Samd
Ivandi
Ósamd
Sera ósamd



**Mynd 27: Nær útisetar vitjaðu í Føroyum seinast (N=120)**



**Mynd 28: Hvussu ofta útisetar eru saman við føroyskum vinfólki, sum eisini búgva í Bretlandi (N=120)**



**Mynd 29: Brúk av føroyskum fjølmiðlum (N=120)**




**Mynd 30: Eg vil fegin vera við til at skapa framgongd í Føroyum. (N=120)**




**Mynd 30.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)**




**Mynd 31: Eg vil fegin at míni (komandi) børn læra føroyskt. (N=120)**




**Mynd 31.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)**




**Mynd 32: Mær leingist eftir náttúruni í Føroyum. (N=120)**




**Mynd 32.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)**



Mynd 33: Eg sakni frítíðarítrivini/mentanarligu tilboðini í Føroyum. (N=120)



Mynd 33.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)



Mynd 34: Tað er gott hjá børnum at vaksa upp í Føroyum. (N=120)



Mynd 34.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)



Mynd 35: Tað hevur týdning at vera saman við familju og vinfólki í Føroyum regluliga. (N=120)



Mynd 35.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)




**Mynd 36: Tað eru vantandi fakligar avbjóðingar og/ella fakligt umhvørvi í Føroyum. (N=120)**




**Mynd 36.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)**




**Mynd 37: Ferðasambandið til og úr Føroyum er ikki nóg gott. (N=120)**




**Mynd 37.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)**




**Mynd 38: Tað er ov torført at finna bústað í Føroyum, sum hóskar til mín. (N=120)**




**Mynd 38.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)**


Mynd 39: Samfelagið í Føroyum er ov konservativt. (N=120)
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
Sera ósamd
Ósamd
Ivandi
Samd
Sera samd


Mynd 39.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
Ongan týdning
Nakað av týdningi
Stóran týdning
Sera stóran týdning


Mynd 40: Frítíðarítriv/mentanarlig tilboð í Føroyum eru ikki nøktandi. (N=120)
45%
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
Sera ósamd
Ósamd
Ivandi
Samd
Sera samd


Mynd 40.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Ongan týdning
Nakað av týdningi
Stóran týdning
Sera stóran týdning


Mynd 41: Støðið í fólkaskúlanum er ikki nóg gott. (N=120)
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Sera ósamd
Ósamd
Ivandi
Samd
Sera samd


Mynd 41.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Ongan týdning
Nakað av týdningi
Stóran týdning
Sera stóran týdning


Mynd 42: Barnaansingarpláss í Føroyum eru ikki nøktandi. (N=120)
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Sera ósamd
Ósamd
Ivandi
Samd
Sera samd


Mynd 42.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)
45%
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
Ongan týdning
Nakað av týdningi
Stóran týdning
Sera stóran týdning


Mynd 43: Fíggjarligar/sosialar stuðulsskipanir í Føroyum eru ikki nøktandi. (N=120)
40%
35%
30%
25%
20%
15%
10%
5%
0%
Sera ósamd
Ósamd
Ivandi
Samd
Sera samd


Mynd 43.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Ongan týdning
Nakað av týdningi
Stóran týdning
Sera stóran týdning


Mynd 44: Veðrið er ov ringt í Føroyum. (N=120)
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Sera ósamd
Ósamd
Ivandi
Samd
Sera samd


Mynd 44.a: Hvønn týdning hetta hevur fyri avgerðina um bústaðarland. (N=120)
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Ongan týdning
Nakað av týdningi
Stóran týdning
Sera stóran týdning

**Talva 1: (36) “Tað eru vantandi fakligar avbjóðingar og/ella fakligt umhvørvi í Føroyum” samanborið við (30) “Eg vil fegin vera við at skapa framgongd í Føroyum”. (N=120)**

| 36 \ 30 | Sera ósamd | Ósamd | Ivandi | Samd | Sera samd | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Sera ósamd** | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,8% | 0,8% |
| **Ósamd** | 0,0% | 2,5% | 0,0% | 5,0% | 1,7% | 9,2% |
| **Ivandi** | 0,8% | 0,0% | 4,2% | 5,0% | 1,7% | 11,7% |
| **Samd** | 0,0% | 0,0% | 5,0% | **28,3%** | **15,0%** | 48,3% |
| **Sera samd** | 0,8% | 0,8% | 5,0% | **10,0%** | **13,3%** | 30,0% |
| **Tilsamans** | 1,7% | 3,3% | 14,2% | 48,3% | 32,5% | 100,0% |

**Mynd 45: Samleikakenslur hjá útisetum (hvat tey kenna seg sum) (N=120)**





Mynd 46: Bretsk samleikakensla í mun til longd á uppihaldi (N=120)
Eingin samleikakensla
Veik samleikakensla
Miðal samleikakensla
Sterk samleikakensla
80%
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Minni enn 1 ár (N=26)
1 ár (N=16)
2 ár (N=20)
3 ár (N=16)
4 ár (N=14)
5 ár (N=8)
6-10 ár (N=10)
11 ella fleiri ár (N=10)




Mynd 47: Bústaður áðrenn flutt var til Bretlands (N=120)
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Í Tórshavn
Í øðrum býi í Føroyum
Á bygd í Føroyum
Í øðrum landi




Mynd 48: Bústaður um flutt verður aftur til Føroya (N=120)
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Norðoyggjar
Eysturoy
Norðurstreymoy
Suðurstreymoy
Vágar
Sandoy
Suðuroy
Annað







*Gevið gætur, at luttakararnir kundu svara tað sama fyri fleiri støð. Til dømis bar til at svara "sannlíkt" fyri allar seks møguleikar.*

## 6.2. Sitat frá kvalitativu kanningini

**Viðurskifti í Bretlandi**

**Orsøk/ir til at fara til Bretlands upprunaliga**

**Vildi okkurt annað enn Danmark**

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)**
*Eg vildi gera okkurt annarleiðis enn at fara til Danmarkar. Eg vildi sleppa at læra enskt. Og eg vildi hava onkrar aðrar førleikar enn onnur, sum eru í Danmark.*

**Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London**
*Tað virkaði eitt sindur meira útfordrandi og meira krevjandi at fara til London enn at fara til Danmarkar. Mær hevur altíð dámt væl enska málið. (...). Eg havi altíð havt tað hugskotið at koma til London. Eitt annað var, at universitetini her eru viðurkend í øllum heiminum. (...). Tað er akkurát sum at fara út í heimin, út um Keypmannahavn, men ikki so langt vekk allíkavæl.*

**Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen**
*Tá ið eg gekk í student, visti eg væl, hvat eg tímdi at lesa, og hvat eg ikki tímdi, og eg visti væl, at eg ikki tímdi niður [til Danmarkar]. Eg tímdi best til Skotlands av onkrari grund. Universitetini eru góð og eg tímdi ikki niður, tí øll fara niður. Útbúgvingarnar eru...tað eru so ræðuliga nógv, sum hava akkurát líka útbúgving. Eg var ræðuliga interesserað í, at hava eina øðrvísi sálarfrøðiútbúgving, enn hvat allir aðrir sálarfrøðingar í Føroyum hava, tí teir hava allir lisið niðri. Eisini tað, at nógv av undirvísingini niðri gongur fyri seg á enskum allíkavæl...og bøkurnar eru á enskum, so kanska tað at sleppa undan einum máli [donskum].*

**Útbúgvingarstuðul hevði ein leiklut**

**Maður, 26, júst útbúgvin, 5. árið í Aberdeen**
*Tá eg byrjaði at hugsa um at lesa, tá hugsaði eg at fáa tvær flugur við einum smekki. At fáa málið [samstundis sum útbúgvingina]. Og eg hugsaði faktiskt England. Men so hevur pápi mín tilfeldigvís verið eitt ár her [í Skotlandi] og tikið eitt sovorðið skeið, og hann lat so øðiliga væl at Skotlandi. (...). Tað var meira ella minni fastlagt at tað skuldi vera Bretland...eftirsum tað er so nær. Eg veit ikki um eg hevði tíma alt for langt, tí tað hevði verið dýrt. Og sjálvandi eisini tað, at tá var tað kortsíðani komið hetta við at teir stuðla tær upp til 120.000. Og áðrenn máttu fólk betala og alt tað. Tað var eg slett ikki intresseraður í. So hevði eg farið til Danmarkar, heilt sikkurt, hevði tað ikki verið. Vissi eg hevði skulað betalt hvørt ár eini 40-50.000 og tá eg hevði verið liðugur við útbúgvingina, skylda eini 3-400.000. Tað hevði eg slett ikki tímað. So eg valdi Bretland, eftirsum at eg kundi fáa stuðul.*

**London er spennandi/ein avbjóðing**

**Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London**
*Mær dámar væl. Nú er tað eisini tað, at eg búgvi í London, og tað er ikki akkurát tað sama sum at búgva aðrastaðni í Bretlandi. Hetta er ein mega stórur býur (...) og mær dámar væl, tí at tað er ógvuliga internationalt. Fólk koma allastaðni frá. Her er nógv at gera, og mítt universitets upplivilsi hevur verið ógvuliga gott. Tað eru fólk, sum krevja nógv av tær, men læra teg eisini nógv (...) eisini gott at finna útav, at her eru nógvir føroyingar.*

**Maður, 29, lesandi, 5. árið í London**
*Tað var soleiðis, at tá ið eg einaferð kom hendan vegin...at ein býur sum London er ein góð avbjóðing. Tað var nakað sum eg vildi upprunaliga. Eisini tá mann hevur áhuga í at fáa sær útbúgvingina her og praktisera her...tað gevur nakað eyka, tí at tað er London. Tað er líka sum eitt heilt serligt stað, serliga tá tað kemur til ymiskar vinnugreinar. Ja, tað sum eg ætli mær í hvørfall.*

**Fjølmiðlar høvdu ein leiklut**

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**
*Orsøkin til, at eg valdi akkurát London er, at eg føldi meg heima beinan vegin her. Altso, tá eg vaks upp í Føroyum, tá var tankin altíð onkra aðrastaðni. Tá eg so bleiv okkurt um 16 kom MTV til Føroyar, sum gratis kanal. Tað var ein stór inspiratións kelda til mín...at síggja hvat skeddi aðrastaðni. Tá byrjaði eg líka sum at seta tað í samband við móta og ein livihátt...og hvussu nemt tað kundi uppnáast aðrastaðni, í mun til hvussu langa tíð tað fór at taka at seta sovorðið upp í Føroyum. (...) Eg visti líka sum aftan fyri onkra staðni, at tað var her, eg fór at vera. (...) Eg kann ikki ordiliga peika á, hvat gjørdi, at eg valdi at lesa her, men tað var nokk mest við tað at gera, at eg identifiseraði meg við tað, og at eg føldi meg øgiliga væl.*

**Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen**
*Eg havi ongantíð ætlað mær til Danmarkar at lisið, men eg havi ætlað mær at lisið. Og eg havi altíð hugsað um Bretland heldur enn Danmark, tí eg haldi tað er okkurt...tí mentanin her. Havi onkra familju í Onglandi, sum...og vit høvdu BBC í sjónvarpinum fyrr og...hugdi nakað eftir tí...havi tímað væl enskt. Lisið enskar bøkur frá mann var lítil (...). So tað var kanska serliga málið og mentanin, sum vóru meira tiltalandi enn tað danska.*

## Trivnaður í Bretlandi

### Kenna seg heima/væl í Bretlandi

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**
*Eg kenni meg ikki endiliga heima í tí bretska, men eg kenni meg heima í tí "Londonska", um mann kann kallað tað so. Tí at tá eg til dømis fáist við ymisk fólk og fólkasløg í mínum dagligdegi, so síggi eg eingilskmannin og turkan uppá sama máta...sjálvt um fólk eru ymisk, so koma øll í puljuna og øll spæla sína rollu. Men eg kann gott indentifisera meg við tað bretska í heila tikið. Uppá nógvar mátar eri eg meira heima her enn í Føroyum. (...). Eg føli meg 100 prosent sum eina London kvinnu tá eg gangið runt. Eg føli meg 100 prosent heima. Eg føli meg ikki bangnan, eg føli meg ikki 'out of place'. Eg føli meg heldur meira 'in place'.*

**Maður, 30, lesandi, 5. árið í London**
*Eg haldi, tað er øðiliga lætt, at kenna seg heima her, tí at meginparturin av fólkunum, sum búgva her [í London], eru innflytarar. Men tað er altíð deiligt at koma heimaftur [til Føroya]. Legg merki til at eg sigi enn 'heimaftur' um Føroyar. Tað er deiligt at koma heimaftur at vitja, men tað er eitt sindur soleiðis, at tá eg eri heima í ein mánaða ella tríggjar mánaðar, tá vil eg altso gjarna sleppa avstað aftur til London. So eg haldi, at eg kenni meg heima her, so nógv sum ein føroyingur nú einaferð kann.*

**Maður, 26, júst útbúgvin, 5. árið í Aberdeen**
*Eg kenni meg heima her...men hvørja ferð eg havi verið her í einar tveir mánaðir, tá leingist mann eitt sindur aftur til Føroya. Og tá ið eg eri í Føroyum og havi verið har í ein, tveir mánaðir, so leingist mann aftur hertil. So mann hevur akkurát sum tvey heim. Mann er eitt sindur splittaður, men ikki uppá ein negativan máta. Eg haldi faktiskt uppá ein positivan máta. At vissi eg bara var í Føroyum, so hevði eg gingið glipp av nøkrum. Og vissi eg bara hevði verið her, so hevði eg følt, at so manglar okkurt, tí at eg føli ikki, at alt er her. Eg føli, at eg havi tvey heim. Tað síggi eg bara uppá ein positivan máta, tí mann sleppur at gleða seg oftari.*

**Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen**
*Føli meg heima í býnum, í Skotlandi og Bretlandi eitt sindur, tí at nú kennir mann bretska mentan. (...). Fitt fólk allastaðni. Mann veit, hví tey eru, sum tey eru, og hvussu mann uppførir seg. Mann dugir 'interaction' við tey, og mann skilir tey, tí mann hevur verið her so leingi. Mann følir seg heima, mann følir seg tryggan.*

## Hugburður mótvegis Bretskari mentan og samfelagnum sum heild

**Fleirmentanarligt samfelag**

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**

*Eg haldi, at eg komi í samband við næstan alt slag av fólkaslagi. Eg arbeiði saman við italienarum. Havi vinkonur frá Australia, Englandi og Suður Afrika… ja alla staðni frá. Eg fáist eisini við fólk sum eru allastaðni frá. Tað er slett ikki nakað, sum eg hugsi um longur. Mann kann eisini hyggja eftir tí, sum eg eti sjey dagar um vikuna...kemur alla staðni frá, og tað minsta av tí er enskt. So tað kemur til alt...at filla búkin, at tosa við fólk…alt er allastaðni frá. Uttan mann hevur hugsað um tað, so hevur mann eisini ígjøgnum dagin tosað við so nógvar mentanir.*

**Klassamunur**

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)**

*Altso fyri mítt viðkomandi í Aberdeen, ella í Skotlandi sum heild, tað er, at eg síggi, hvussu skotar eru. Altso hvussu mann definerar ein skota. Og soleiðis sum samfelagið her er. Altso, eg haldi nógv ting her í Skotlandi eru fullstendiga langt úti. Hvussu samfelagið er uppbygd, hvussu samfelagsstættirnir eru uppbygdir. Sosiali arvurin hjá teimum. Tá ið tú hevur sum so akkurát somu møguleikar at blíva til nakað, sum aðrastaðni, men allíkavæl hevur tú ein sosialan arv har tú ikki...har tú bara ert í tí sama syklusinum altíð.*

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (2)**

*Her er nógv gott at fara eftir, men tað er ræðuliga keðiligt við einum so týðiligum klassamuni. Og hinvegin, tað er feitt í Føroyum, at tað ikki er tað.*

**Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen**

*Eitt, sum mann leggur merki til er, at tað er nógv størri klassamunur her enn í Føroyum. Annars finnur mann skjótt útav, at fólk líkjast meira føroyingum, enn mann hevur hildið.*

**Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen**

*Eg havi ein heilt annan hugsunarhátt og tilgongd til ræðuliga nógv ting. Meira optimistisk uppá ein máta. Og...tað haldi eg karakteriserar ræðuliga nógv tey her, at tey hava ikki eina fleksibla tankagongd í sambandi við klassamun...hvussu eitur tað á føroyskum "social mobility" at mann kann arbeiða seg uppeftir í samfelagnum. Tað, haldi eg, er ein ræðuliga stórur munur. Eg trúði slett ikki, at tað var nakað sum at klassasamfelag fyrr enn eg kom hertil. Eg helt, at tað vóru bara nakrar teoriir um eitt samfelag, sum ikki ordiliga var til meir í vesturheiminum. Men her er er tað øðiliga prekað av tí. Tað er eisini ein manglandi optimisma haldi eg, sum vit hava, tí tað er ikki okkara klassi ordiliga sum avmarkar okkum, tá ið tað kemur til at fara at lesa á universiteti. Tað kann ein og hvør føroyingur, fíggjarliga. Tað kann mann bara ikki her.*

**Kunnu læra av bretum**

**Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen**

*Eg haldi, at vit í Føroyum kunnu læra av teimum. Til dømis, tá tað kemur til at integrera fólk og sovorðið. Tað hevur eydnast væl her. Útlendingar í Aberdeen og...universitetið í Aberdeen, haldi eg, riggar nokkso væl sum dømi uppá, hvat tað kann vera í Føroyum. Onkur hevur tosað um eitt stórt universitet einaferð, og hvør skal ganga har. Her eru eini 20.000 meir í býnum, tá ið fólk ikki eru í feriu. Og ræðuliga nógvir útlendingar, sum føla seg vælkomnan her. Tað er gott fyri vinnurnar í økinum. Møguleikar av øllum møguligum slag. Og at fáa nýggjar heilar til virkini her.*

**Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen**

*Bretar eru meira fólkaligir og blíðir enn føroyingar. Tey eru meira opin yvirfyri fremmandum fólkum. Tú sitir ikki og følir teg illa, í hvussu er eg, tá ið tú sitir í einum tíma og roynir at úttrykkja teg. Sjálvt um tú ongantíð kemur at tosa líka væl sum tey. Tú følir teg yvirorðnað øðiliga væl, haldi eg. Eg veit ikki, um tað er tí, at tey eru von at hava fólk, sum ikki tosa øðiliga væl enskt. Tey eru von við at hava nógv onnur fólkasløg og sovorðið inni. Eg veit ikki, um tað er tí, men eg haldi, at tað er í hvussu er eitt inntrykk, sum mann fær øðiliga skjótt.*

## Samband við Føroyar og føroyingar

### Sosiala netverkið

#### Aðrir føroyingar í Bretlandi

**Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen**
*Tað, at tað eru so nógvir føroyingar her, ger, at mann følir seg eyka føroyskan og heima og tryggan og ikki so langt heimanífrá. Og ger tað, at mann kanska hugsar um at flyta heimaftur, tí at mann tosar føroyskt allatíð og kemur saman við føroyingum.*

**Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen**
*Her hevur verið øðiliga gott at verið, men tað hevur kanska okkurt við tað at gera, at her eru nógvir føroyingar, og at vit komu skjótt inn í ein bólk av fólkum...av føroyingum. Og at mann kom at kennast, faktiskt bara tí mann var føroyingur. Og nú hevur mann fingið fleiri ordiliga góðar vinir. Eisini so valdu vit at búgva á kollegii, og har komu vit at kenna nógv fólk her frá. Tað helt eg vera ordiliga positivt. At koma inn í mentanina ordiliga. Og skúlan kann eg eisini bara siga gott um allan vegin ígjøgnum. Her er øðiliga annarleiðis enn í Føroyum, men eg haldi gott, at tað, sum er øðrvísi, kann vera gott.*

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**
*Eg síggi føroyingar her niðri við hvørt. Altso, eg royni ikki at síggja føroyingar fyri at síggja føroyingar, ella tosa føroyskt. Tað, at tosa heim, uppfyllir alt hatta har sum so. Men serliga í fyrstani, tá einki samband var, so hevur tað hjálpt mær at 100 prosent integrera meg her yviri, uttan at leita eftir sikkurheitsnetum (...) nú er tað meira ein sosial hending [tá ið føroyingar hittast], tí at mann er blivin eldri, og tað er stuttligt at síggja fólk og vita hvat sker. Kanska tey hava meira informatiónir um hvat sker heima, enn mann sjálvur hevur.*

#### Samanbering av føroyskum og útlendskum vinfólkum

**Maður, 29, lesandi, 5. árið í London**
*Tað er ein ekstremt stórur munur á netverkinum hjá mær her og tí í Føroyum. (...) herbeint kenni eg øðiliga nógv fólk, men ikki serliga væl, men heima kennir mann tey øll øðiliga væl...veit akkurát hvørji tey eru. Eg haldi, at her er tað ikki so nógv behov fyri at koma so djúpt inn á ein persón. Mann er ein meira privatur persónur her beint. Mann hevur síni vinfólk, men kennir tey ikki so øðiliga væl.*

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**
*Eg kann siga, at tað er eingin munur á loyaliteti og sovorðin ting eru faktiskt tað sama. Men av tí at mann er í stórbýnum her yviri, so prátar mann eitt sindur skjótari. Mann er kanska eitt sindur meira sarkastiskur og mann fangar kanska hvønn annan eitt sindur skjótari, av tí at alt er so 'fast pace' her yviri. Meðan tá mann kemur heim til vinirnir, so er tað ein heilt onnur rytma. Og kanska gloymir mann onkuntíð, tá mann kemur heim, at okkurt var for skjótt ella for ljótt, ella eitt ella annað...so verður tað ikki fangað uppá rætta máta. Vinarmessiga, eru vinarbondini líka vigtig har, sum tey eru her, og tey eru fyri so vítt tey somu, altso. Eg haldi ikki at tað er stórur, stórur munur á heima og her. Men tað kemur nokk mest av tí, at tey, sum mann hevur heima, er mann uppvaksin við. Tað hevur sínar kvalitetir, men her er tað sovorðnir, sum mann hevur møtt seinni í lívinum og sær meira. Tað er nokk størsti munurin. Hevði tað verið eitt nokkso stórt problem, av einum ella øðrum slag, so hevði eg nokk tosað við onkran her yviri, tí at eg tosið við tey meir. Ikki tí at tað er nakar munur, vinarmessiga. Tað er bara tí at mann sær tey meir.*

### Vitjan til Føroya

#### Dýrt at ferðast

**Maður, 29, lesandi, 5. árið í London**

*Seinastu trý árini havi eg verið eina ferð um árið í Føroyum, altso um summarið. Tað er minimum eina ferð, ella kanska tvær ferðir, um jólini. Tað kostar at koma heim. Eisini nokkso begrensað, hvussu nógva tíð mann hevur og sovorðið nakað. Altso, vissi eg skuldi búð her beint og farið heim tvær ferðir um árið, so hevði eg ikki farið nakra arðastaðni, so tað er nøkulunda. So, eg trúgvi eina ferð um árið er realistiskt.*

**Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London**
*Eg plagi at fara heim tvær ferðir um árið. Men eg hevði gjarna vilja farið heim oftari. Altso arbeiðið krevur sítt tá mann er útlærdur, so eg kann ikki bara fara heim í trýggjar mánar, men eg hevði ógvuliga gjarna vilja sæð bilettirnar blivið bíligari, so mann hevði kunna farið heim oftari. Ikki bara fyri at síggja familju og vinir oftari, men eisini fyri tað vinnuliga og fáa møguleikar har og halda tað við líka. Tað er fullkomuliga absurt, tí at eg kann fara til Morokko ella longur fyri sama prís. Tað ger at mann ikki kann fara heim so oftani, sum mann vil. Eisini tí, at eg arbeiði sjálvstøðugt, so eg fái ongan at betala bilettir fyri meg.*

**Helst í arbeiðsørindum**

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**
*Eg royni at fara [til Føroya] hvørji Jól, og so royni eg at fara einaferð soleiðis um seinsummar. Tað er planurin. Fyriuttan at tað sker nakað soleiðis sum brúdleyp, begravilsi ella okkurt sovorðið. So annars haldi eg ikki, at mann fer heim. Jú, tí tá eg havi havt størri projektir heima í Føroyum, so hava tey kanska havt brúk fyri mær, at eg flúgvi heim eitt vikuskifti og arbeiði saman við teimum o.s.v. Tá havi eg kanska verið heima einar 10 ferðir tað árið. Tað er fínar greiðir. Tað er einki galið við tí. Vissi eg skal heim, serliga í onkrum arbeiðsørindum, elski eg at fara heim. (…) tí at eg trívist best við at arbeiða. (...) eg hevði ikki tímað at farið heim so ofta bara fyri at slappa av. Mær dámar væl at fara heim ofta, so leingi sum har er eitt mál at fara heim til av einum ella øðrum slag.*

**<u>Hugburður til føroyska mentan og samfelagið sum heild</u>**

**Fyrimunir/positivt við Føroyum**

**Føroyar er heimið**

**Maður, 30, lesandi, 5. árið í London**
*Eg haldi at Føroyar altíð verður heimið. Tað haldi eg. Eg haldi at tá mann...ja onkuntíð hevur mann hug at blíva eitt sindur romantiskur um tað, men tað er eitt ella annað við at har eru nøkur bond, sum ongantíð koma at slítast. Tað er hatta har við náttúruni og at vera umringaður av fjøllum og havi. Eg trúgvi, tað fer ongantíð úr einum føroyingi. Mann hoyrir ofta um familjur sum eru fluttar til Danmarkar, sum flyta heimaftur aftaná 10-20 ár. Har er eitt ella annað, sum knýtir okkum at Føroyum.*

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)**
*Eg kenni meg mest heima, tá ið eg eri í Føroyum. Tað kemur sjálvandi av tí, at mann er føddur og uppvaksin í Føroyum. Mann hevur sína familju. Mann hevur eitt heim at koma heim til. Mann hevur eitt kamar. Tú hevur tína familju, tú hevur tínar vinir. Og tað, at tey tingini, sum definera ein føroying, eru tættari við. Tað, at tú hevur føroyskan mat og føroyska mentan, tað, sum tú kallar føroyska mentan. Tað liggur mær øðiliga nær.*

**Føroyar eru tryggar og avstressandi**

**Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London**
*Hesin tryggleikin heima er so avstressandi. Eg veit, at tað eru fólk heima, sum eru stressaði av at arbeiða, men eg rokni við, at tað má vera eitt av teimum minst stressandi støðunum í verðini, í hvørt fall um familjusystemið hjá tær fungerar, og vissi tú hevur nóg nógv at gera í frítíðini. Jú eldri eg blívi, jú meira hugsi eg um tað.*

**Unga ættarliðið er broytt**

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**
*Tann generatiónin undir mær, er ein heilt nýggj generatión, so tá eg komi heim, í fyrstani, so helt eg, at tey fóru at vera, líka sum eg var, tá eg var í teirra aldri. Men tey eru nógv framkomin…tað ljóðar kanska eitt lítið sindur soleiðis snedugt, men tey eru meira opin, hava broytt meiningar og eru meira vokal, enn vit vóru eisini. Og tí verður mann eitt lítið sindur sjokeraður, tá mann kemur heim, so er tingini so nógv broytt. Tí hvørja ferð mann kemur, kemur mann altíð við tí gamla høvdinum heim, sum mann fór avstað við. Tí er tað týdningarmikið, at eg broyti mín hugburð. Til at líka sum 'update', til at nú sker nøkur nýggj ting heima og t.d. arbeiðsmessiga vildi eg hildið, at tá eg kom heim fyri 10 árum síðani, og eg kom við onkrum nýggjum, tá tók tað kanska teimum eitt ár ella tvey, áðrenn tað kom til Føroyar. Nú tá eg komi heim, tí at mann hevur internet og onnur samband, fólk ferðast í heilum, so eru tey fulkomuliga update'aði til akkurát tað sama, sum eg eri, ha? Og uppá tann mátan, tað er líka sum nakað nýtt. (...) Tað síggi eg sum nakað gott.*

**Ókeypis/góðir frítíðarmøguleikar**

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**
*Tá mann kemur heim til Føroyar, so kemur mann oftani við tí í høvdinum, at mann er útlendingur sjálvur, tí at mann setur meira virði á náttúruna; tað er eitt stórt luksus, tá mann kemur heim. At mann bara kann fara ein gongutúr niðan í hagan ella Svartafoss. Tað, í sær sjálvum, kann vera eitt upplivilsi fyri meg, og so hugsar mann um møguleikarnar, um tað var ein útlendingur, sum aldrin hevur verið í Føroyum fyrr, hvussu nógv mann hevur at bjóða uppá, uttan at mann skal keypa seg til tað. Meðan her er óendaligt servera á einum fati, fyri ein pening.*

**Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London**
*Eg haldi, at tað er massar av frítíðarmøguleikum í Føroyum. Eg gekk til dans, eg spældi við einum jazz horkestri, sang kór og so víðari. Eg haldi, at møguleikarnir at vera kreativur, og skapa nakað eru nógv størri í Føroyum enn nógva aðrastaðni. Her [London] er nógv ting at fara til og síggja, men øgiliga passivir frítíðarmøguleikar. Sjálvandi kann mann eisini tað [kreativa] her. Men í Føroyum er tað akkurát sum hasin nærleikin. (...). Tú kanst stovna títt kór í morgin, venja í tríggjar mánaðir og hava eina framførslu onkunstaðni. (...) Teir [møguleikarnir] eru nógv størri í Føroyum. Eisini um tú vil taka tað til eitt hægri stig og umboða Føroyar internationalt ella í Norðurlondum. Eisini eru tað møguleikar hjá børnum í ítrótti og sovorðið nakað. Um mann vil nakað øðiliga spesifikt, so er tað kanska ringt. Um mann vil, so finnur mann okkurt, og mann hevur nógv meira tíð. Tað eru so stórir avstandir í stórbýnum, meðan í Føroyum er tað nógv tættari.*

**Maður, 26, júst útbúgvin, 5. árið í Aberdeen**
*Altso Føroyar er ræðuliga nógv broytt tey seinastu árini, haldi eg, til tað positiva. Fyrr var munurin kolossalur, meðan nú er hann ikki. Vil eg bowla, so kann eg tað. Skal eg í biograf, so kann eg tað. Tú hevur nógvar møguleikar, men tað er líka eitt, sum irriterar meg, og tað er tað við rúsuni og rúsdrekkapolitikkurin. At vissi mann ætlar sær í býin, so má mann planleggja ordiliga áðrenn. Tað er ikki tann heilt stóri munurin, men tað er munur allíkavæl. Her er fríari, her er meira og alt hetta her.*

**Góðir starvsmøguleikar**

**Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen**
*Eg haldi, at har eru góðir møguleikar [at finna starv]. Eg havi spurt meg fyri hjá øðrum, sum arbeiða í Føroyum, og eg haldi har eru ordiliga nógv spennandi arbeiðir, sum eg hevði tímað ordiliga væl. Og har eru óivað eisini møguleikar at skapa sítt egna, um tað er.*

**Vansar/negativt við Føroyum**

**Vantandi starvsmøguleikar**

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (2)**

*Mítt indtryk er, at mann má redusera seg sjálvan eitt sindur, um mann vil arbeiða í Føroyum. Um tú kemur til Føroya við einum Ph.D. í til dømis biologi, so eru tað eini fimm arbeiðspláss, sum tú kanst fara í. Sum studentaskúlalærari ella heilsufrøðiligu starvsstovuni...eitt ella annað, tú veitst. Tað eru ikki verðins mest avbjóðandi størv í Føroyum. Tað eru ikki serliga nógv størv, sum passa til hægri akademiskar útbúgvingar. Tað er kanska fínt, um tú hevur eina meira generella útbúgving, kommunikasjón ella politikk í bachelor. So er tað nokkso nógv, tú kanst gera...relativt nógv. Men tær resursir og teir førleikar, sum tú hevur útviklað við at gera eina Ph.D. í fleiri ár, teir vera ikki brúktir til fulnar, tað haldi eg ikki. Tú livir ongantíð ordiliga upp til potentialið, sum tú hevur. Tað er mítt indtryk.*

**Maður, 29, lesandi, 5. árið í London**
*Uttan at tað verður for negativt, so eru Føroyar eitt ræðuliga lítið land og tað er nokkso avmarkað, óansæð hvørja vinnugrein tú hevur. (...) Har eru ikki so nógvar avbjóðingar, arbeiðsmøguleikar og hvat tú hevur møguleika fyri at tjena og hvat tú hevur møguleikar fyri at gera yvirhøvur. Tað er ein øðiliga vigtigur postur hjá mær.*

**Avmarkað sjónarhorn viðvíkjandi útbúgvingum uttanfyri Danmark**

**Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen**
*Har er eitt sindur av manglandi vitan og perspektivering í Føroyum, tá ið tað kemur til útbúgving, tí tá ið tú hyggur at lýsingum til størv í tí almenna...tey søkja ofta eftir fólkum við donskum heiti, altso cand. mag. ella cand. mag. psych. Tað fær teg at hugsa eitt sindur um, hví tað er...hví hatta enn er so avmarkað, tá ið tað eru so nógv, sum lesa aðrastaðni enn niðri. Og fakfeløg í Føroyum eru ræðuliga hysterisk um tey fólkini, sum tey umboða. At mann skal vera til dømis pedagog við útbúgving úr Danmark ella Føroyum. So tankagongdin og kanska eisini lógarásetingar eru eitt sindur avoldaðar. So tá ið eg hugsi "jú, eg fari heim. Eg ætli mær at gera okkurt við tað", men samstundis følir mann, at mann ikki passar so ræðuliga væl inn. Mann følir seg eitt sindur fremmandagjørdan.*

**Minni áhugavert í Føroyum**

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (2)**
*Tað er nógv meira interessant at fylgja við í samfelagnum í Bretlandi enn í Føroyum. Tíðindi eru nokkso inconsequential [ikki týðandi] í Føroyum. Hvat so um samgongan slitnar? Tað hevur onga ávirkan. Og tað henda meiri ting her. Samfelagið er bara uppá onkran máta meira interessant enn í Føroyum. Og her er ein nógv sterkari tradisjón fyri intellektualismu. Altso, tað eru klók fólk, sum sleppa framat í miðlunum og alt tað. Sjálvandi so er tað hin síðan, tann ultraprimitiva tabloid mentanin. Svakliga primitiv. Og tað kanska reflekterar ein klassamun, sum er her. (...) umhvørvið er hægri raðfest her enn í Føroyum. Eg haldi tað er orsakað av eini anti-intellektualismu í Føroyum...eini anti-elitismu. Tú skalt ikki koma her og siga nakað. Eitt slag av jantelóg. Tað hevur tú ikki her uppá sama máta.*

**Samfelagið í Føroyum ov konservativt**

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)**
*Føroyar er alt í verðini for konservativt. Føroyar er ein so lítil tjóð. Tað burdi verið møguligt at tilpassa...at fingið nøkur ting...altso at nýggj ting kundu hent skjótt. Til dømis at fáa nýggjar vinnur í gongd. Smíða nýggjar lógir og alt sovorðið har. Tað burdi kunna gingið eitt sindur skjótari at tilpassa seg til nýtt umhvørvi. Nú er fiskurin (fiskiskapurin) ein farin tíð. Men mann hongur enn uppií tí. Tað er av tí, at føroyingar eru so konservativir. Teir eru bangnir fyri, at tað skal henda nakað nýtt í Føroyum, og teir eru bangnir fyri...altso hygg bara eftir útlendingalógini...tey vilja ikki hava útlendingar til Føroya. Tað eru sovorðin ting, sum eg haldi at Føroyar kundi gjørt betri. Og tað virkar, sum tað eru nógvir Føroyingar, sum halda, at tað er ein miðdepil í verðini næstan. Tí teir hava ikki sæð nakað annað, og halda tað, at Føroyar er nakað spesielt. Altso sjálvandi eru Føroyar nakað spesielt, men ikki nakað, sum ger nakran mun um mann hyggur internationalt uppá nakran máta.*

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**
*Men tann mátin, sum eg ikki føli meg heima uppá [í Føroyum], er nokk tað, at tað er for konservativt, bæði í forhold til hvussu eg eri uppvaksin, men eisini soleiðis, sum eg eri broytt, meðan eg havi verið her. Tað er akkurát sum at hasin gamli skúlin, hann er stadigvekk har, og tað er kanska tað, sum ger, at tey ungu hava fingið nøkur nýggj ting, nýggjan hugburð o.s.fr. og tað dámar mær ordiliga væl. Eitt slag av polarisering er farin fram. (...)*

*Tað konservativa er tað, sum eg irriterist nokkso nógv á, (...) visuelt, úttalilsini í bløðunum…tey eru so ógvuslig. Altso har er eingin respekt. Eisini tí at mann býr so ræðuliga multikulturelt her yviri, so verður mann eitt sindur fornermaður, tá mann kemur heim og hoyrir frá ymiskum flokkum og ymiskum fólki. Eisini privat (...). Serliga hetta her "eg eri ikki rasist, men…". Eg eri simpulthen so troytt av sovorðnum, tí at eg sjálv eri útlendingur, tá eg komi henda vegin. Eg haldi, at tað skal broytast, áðrenn eg komi aftur. Tað er ordiliga býtt, at tað skal irritera meg so nógv, men tað ger tað.*

*(...) Tíbetur er tann [konservativa] generatiónin við at fara eitt sindur, og tær generatiónirnar, sum koma upp nú, eru so heilt ótrúliga frísk og nýhugsandi. Ja, tað hevur verið leingi, men tað hevur verið tann størsta uppmuntringin, um eg hevði farið heim.*

*(...) Tað materialistiska betýðir slett einki, tí at eg veit, at tá eg komi heim til Føroyar, tá er kvaliteturin á lívinum so høgur. (...) Tað er mest hugburðurin.*

**Maður, 30, lesandi, 5. árið í London**
*Eg havi eina sovorðna kenslu av at vera mitt ímillum onkrastaðni, tá ið eg eri heima í Føroyum. Kanska er tað, tí at eg havi verið nógv heima og arbeitt, og flogið ímillum óteljandi ferðir. Kanska er tað tað, sum ger tað, at tá eg fari heim í ein mánaða, at eg eri eitt sindur rastleysur. Har er eitt ella annað.*

*(...) Har er nógv í Føroyum, sum fáa meg at hugsa "lat meg sleppa vekk herfrá". Til dømis, tá ið politikkur blívir...politisk mál blíva viðgjørd útfrá persónligum religiøsum sjónarmiðum, tá hoppi eg av. Tá hugsi eg: "altso, eg tími ikki at búgva her". Tað er eitt sum ger at...eitt av høvuðsmálunum sum ger, at eg ivist í um eg nakrantíð...altso sjálvt um eg flyti aftur til Føroya, so veit eg ikki hvussu leingi tað verður, tí eg klári ikki sovorðið. Tað er eisini eitt, sum er hent nú, tá eg eri fluttur til London. Mann er bevístur um, at mann kanska vil seta nøkur krøv til tað samfelagið, mann býr í. Ístaðin fyri at tá eg búði í Føroyum, tá var tað bara: "soleiðis er tað bara". Tað er so vekk nú. Eg kann ikki liva í einum samfelag og bara acceptera ting, sum um at soleiðis er tað bara. Tað gongur ikki. Tað er so hent síðani, eg flutti til London. Og at síggja á portalinum hesar yvirskriftirnar sum hoyra heima í Saudi Arabia...tað øsir meg. (...) Tað at ein sovorðin hugsunarháttur finst í vesturheiminum, tað er ófatiligt. Og har eru óteljandi dømi, altso. Teir práta um at sensurera internet og annað. Tað gongur bara ikki. Og eg fari ikki at liva í einum sovorðnum samfelag. Føroyar er tað einasta norðurlandið, har tað gongur aftureftir í liberalum samanhangi. Meðan hini londini blíva meira liberal, so vísir tað seg, at í Føroyum verður prátað um fleiri avmarkingar. Tað gongur bara ikki í mínari verð. Tað er grund nokk til, at eg ikki tími at vera har. Tá ið 266b var frammi...tað bleiv so samtykt, og alt gott um tað, men øll tey tingini, sum komu fram undir tí málinum. Nú havi eg ein vinmann, sum býr í Danmark orsakað av hesum. Og at hoyra í fjølmiðlunum hvussu tosið fer fram, og hvussu føroyskir politikkarar kunnu úttala seg, uttan at tað fær fylgjur. Tað er sjokerandi. Hatta burdi ikki verið hent. Hatta burdi ikki kunnað hent í einum sokallaðum siviliseraðum landi. Tað er hol í høvdið, men soleiðis er tað bara. (...)*

*So um eg skal flyta heim, so verður tað ikki ókritiskt. Tíbetur er tað hent, at mann ikki bara sigur: "soleiðis er tað bara". Sjálvandi, har eru nógv onnur ting eisini...altso småting, men yvirhøvur...føroyingar eru eitt deiligt fólkaslag, men aftaná eina tíð so blívir mann nokkso troyttur av at hoyra ella tosa um tey somu tingini allatíðina. Sjónarringurin hjá nógvum fólki her er so ótrúliga breiður í forhold til í Føroyum, at tað er uppfrískandi at búgva her og at tosa við fólk her og at koma saman við fólkum her. Tað fari eg at sakna, vissi eg flyti heimaftur. Tað er so heilt sikkurt.*

**Maður, 29, lesandi, 5. árið í London**
*Eg trúgvi eisini, at samfelagið, sum heild, kundi verið nógv meira liberalt. Mann er so ræðuliga konservativur á nógvum økjum. Tað er eisini frustrerandi fyri fólkini. Eg hugsi serliga um destruktivar forðingar og lógir til dømis rúsdrekka lógir, heilidags lógir…jaja sovorðnir dinosaurar, sum stadigvekk eru í Føroyum.*

**Politiska støðan frustrerandi**

**Maður, 29, lesandi, 5. árið í London**
*Eg rokni faktiskt við, at politiska støðan ger nógvan mun. Tað er eitt sindur frustrerandi at verða føroyingur oftani, tí at tað við Danmark er eitt sindur frustrerandi. Hevði mann blivið samdur um eitt ella annað viðvíkjandi sjálvstýrisleiðini, so trúgvi eg, at tann identiteturin, samleikin hevði blivið nógv sterkari. Bara, at eg minnist aftur, tá eg gekk í Hoydølum í 98, tá helt mann, at mann fór at vera samdur um, at nú fór okkurt at henda. Tá var ein ótrúliga góð kensla í landinum. (...) tað ljóðar eitt sindur sum smáting, men í mínari verð er tað eingin ivi um tað, at tann politiska støðan og samleikin eru øðiliga nógv tengd at hvørjum øðrum. (...) ja tað er so tað allarfyrsta; tað politiska.*

**Aðrar viðmerkingar um føroyska samfelagið**

**Brúk fyri fólki við útbúgving**

**Maður, 29, lesandi, 5. árið í London**
*Altso, eg haldi at føroyska samfelagið hevur brúk fyri øllum kreftum. Serliga fólki við hægri útbúgvingum. Tí eftir mínari meting, so eru føroyingar lutfallsliga, nú sigi eg lutfallsliga, vælútbúnir. Føryingar hava generelt eitt høgt útbúgvingarstøði innan fyri..altso øll hava eina útbúgving, men tað er ikki so nógvar heilar akademiskar útbúgvingar. Eg haldi føroyingar hava stóran tørv á fólki við hægri lesnaði. Bæði innan fyri almannaverkið, tað politiska og so víðari.*

**Realpolitisk viðurskifti viga meira enn frítíðarmøguleikar**

**Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen**
*Eg haldi at gott arbeiði, barnaansing og eitt gott stað at búgva vigar meir enn frítíðarmøguleikar. Tað vil eg siga. Eg haldi tað vera nokkso órímiligt at forlanga at Havnin skal vera tað sama sum Aberdeen ella sum Keypmannahavn, tá ið tað kemur til frítíðarmøguleikar. Tað haldi eg ongantíð, at tað kann. Eg haldi ikki, mann kann krevja tað. Sjálvandi skulu frítíðarmøguleikar og ymiskt innanfyri mentan vera á einum rímiligum støði, men eg haldi bara ikki, mann kann forlanga, at tað er tað sama sum uttanlands.*

## <u>Samleikakenslur</u>

**Fyrst og fremst føroyingur**

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)**
*Eg eri ein ordiligur føroyingur. Tjóðskaparkenslan blívir altíð nógv størri, tá ið mann fer uttanlands, haldi eg ofta, tí mann sær, hvat vit hava, og hvat vit ikki hava. Altso vansar og fyrimunir við at vera føroyingur. Hvussu heldig vit í veruleikanum eru í nógvum førum. Og eisini í nógvum førum, hvat tað er, sum ger, at vit ikki eru komin longur. Men eg føli meg sum ein ordiligan føroying. (...) eg síggi tað, at vit hava ein kultur, sum eg haldi er meira mennandi og gevandi enn tann skotski, altso okkara máti at liva uppá, har tú hevur stór familjuvirðir...ella har familjuvirðir hava nakað at siga. Og at tú heldur saman við vinfólki og familju. Og hvussu...ella hvat er tað, tú leggur dent á í lívinum. Altso, hvat ein føroyingur leggur dent á í lívinum, og hvat ein skoti leggur dent á í lívinum. (...).*

**Maður, 29, lesandi, 5. árið í London**
*Mín samleiki...jaja, tað er fullstendiga ótreytað føroyskt líka sum tað var áðrenn. Tað er eingin ivi um tað. (...) Tað er ikki nakað, sum eg hugsi serliga nógv um. Tað er ótreytað.*

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**
*Eg eri føroyingur, og tað vil altíð koma fyrst, og tað merkist altíð í mínum arbeiði og tankagongd og so víðari. Har eru ymisk ting, mann líka verður settur inn í, tá mann er uppvaksin í Føroyum, sum altíð vilja koma við. Men tað er farið øðiliga nógv til síðuna, og tá mann er føroyingur, endar tað har. Mann hugsar ikki so nógv um tey tingini, sum mann burdi gjørt sum føroyingur. Tað er meira, at nú livi eg lívið hjá mær, og nú fer tað víðari til tann næstan kapittulin, og tað er tað, sum tað handlar um. Men føroyingurin í mær fer altíð at vera har. Føroyingurin í mær er líka viktigur, sum arbeiði hjá mær er. Tað kemur ikki á eitt hægri ella lægri støði.*

**Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London**
*So skjótt eg flutti úr Føroyum, so fekk tað nógv størri týdning, tað at mann var føroyingur. (...) Eg vildi ikki sagt, at eg føli meg sum ein heimsborgara, tí tað er ein sovorðin kliché, og tað passar heldur ikki.*

*(...) Tað hevur nakað at siga, at mann veksur upp í smáum forholdum. At familja hevur nógv at siga, at familjan er stór, og at mann kennir tey øll, sysknabørn, trímenningar, ommudid og abbadid.*

*(...) Um eg fái børn, so hopi eg, at tey einaferð eisini kunnu vera eitt sindur føroysk. So eg vóni at kunna leggja nakað føroyskt í tey eisini.*

**Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen**
*Eg eri føroyingur og norðurlendingur ella skandinavi. Fyrst og fremst føroyingur og so norðurlendingur. Føli mest til felags við Ísland og Noreg og kanska Grønland uppá onkran máta. Eg kenni meg kanska eitt sindur av [bretskum] tilknýti, tá ið eg eri heima ella onkra aðrastaðni. Beint nú, tá ið eg eri her [í Aberdeen], tá føli eg meg ikki so bretska. (...) Mann blívir meira tjóðskaparsinnaður og føroyskur og sovorðið [av at vera uttanlands]. Ja ehm...eg veit ikki, um eg eri blivin meira bretsk, men eg eri minni donsk, haldi eg. Nú tá ið eg fari til Danmarkar, føli eg meg ikki ordiliga heima ella...sum mann gjørdi áðrenn, ha? Sjálvt um eg havi familju. Ommu, abba, fastrar, systkinabørn og...eri har minst tvær ferðir um árið.*

**Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen**
*Eg haldi ikki, at eg føli meg bretska ella skotska...tað haldi eg ikki [flennur]. Eg haldi fyrst og fremst, at eg eri ein føroyingur, men allíkavæl, so virkar tað ofta, sum mann stendur á síðulinjuni og kann observera tey, sum eru búgvandi í Føroyum. So tað er nokkso ringt at siga, um mann er líka sum tey, ella um mann er blivin ein føroyingur sum er í útlegd, hvat so enn tað er. (...) og hinvegin, tú kanst eisini vera ein føroyingur í útlegd, sum bara leingist heim og hugsar um at sleppa heim. Eg síggi meg meira sum ein føroying í útlegd, sum er farin útum, sum eisini stendur á síðunlinjuni og hyggur eftir nøkrum tingum...kann observera nøkur ting, sum eru góð og nøkur ting, sum slett ikki er góð...nøkur ting sum skulu broytast, men samstundis sum ein persónur, sum gjarna vil koma aftur og broyta nøkur ting. Men føli meg ikki skotska.*

### Samleikakenslan broytt undir uppihaldinum í Bretlandi

#### 'Gypsy' samleiki

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**
*Altso tað, sum eg fann útav tey fyrstu árini, tá eg búði her, var at tað, at mann er føroyingur er øðiliga gott, men tað, sum eg fann útav, var at tað er týdningarmikið at integrera seg her yviri. Tað merkti so, at mann var ein 'foreigner' líka sum øll hini, og tað, at mann bleiv akkurát sum bara ein av øllum hesum milliónirnum bleiv tann nýggi identiteturin, men mann føldi altíð, at mann hevði hetta her spesiella við, at mann var føroyingur. Tað við arbeiði og so víðari, tað broytist við aldrinum og við umstøðum allatíðina. Tað broytist enn. So, tað er 'constantly evolving' sum mann sigur. Men tað er so, ja eg veit ikki um eg kanska eri ein sovorðin 'gipsy' samleiki. Tað er kanska tað, sum er*

*mín identitetur. (…). Altso, tað er ringt at peika á, akkurát hvat mann er, tá mann hevur verið næstan helvtina av sínum lívið her yviri.*

#### Norðurlendski/skandinaviski samleikin lúrir

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)**
*Hann [samleikin] er broyttur [undir uppihaldinum í Bretlandi], ja...hann er meira...ella sterkari [kensla av at vera føroyingur]. Eisini haldi eg sjálvur, at eg eri blivin meira...eg veit ikki um mann kann siga tað...meira skandinaviskur. Ella pro-skandinaviskur...og eg síggi skandinavar sum, altso...eg haldi, at tey eru komin nógv longur enn bretar sosialt og mentanarliga.*

**Maður, 30, lesandi, 5. árið í London**
*Tá eg vaks upp í Føroyum, sum smádrongur, so sá eg meg ongantíð sum føroying. Eg var ein av hesum í MTV generatiónini. Eg sá meg sum ein evropeara heldur enn ein føroying. Ella tað vildi eg gjarna síggja meg sjálvan sum. Tá eg so flutti til London, fann eg útav, at tað var faktiskt ikki heilt rætt. Eg eri ikki so nógv evropeari. Eg eri heldur ein skandinavi...meiri enn nakað annað. So vissi onkur spyr meg, so haldi eg, at tað er nokk tað, eg fyrst vildi fortalt teimum, og síðani tað at eg var úr Føroyum. Men vónandi broytist samleikin so við og við, tá ið mann flytir til nýggj støð. Annars hevur mann misskilt eitt ella annað. Men eg trúgvi ikki, at øll gera tað. Summi koma her, og halda bara saman við sínum egnu landsmonnum uttan nakrantíð ordiliga at læra enskt. So eg trúgvi, at mann kann gott flyta til London, uttan at samleikin broytist, men eg...tað er stór synd um tað hendir. At halda krampaktigt í nøkrum, tað...altso samleiki skal heldur ikki vera ein religión...tað skal vera hampiliga dynamiskt vildi eg trúð.*

#### Øðrvísi at koma heim

**Maður, 29, lesandi, 5. árið í London**
*Eg kenni meg heima [tá eg eri í Føroyum], men fyri hvørt ár verður tað eitt sindur øðrvísi hvørja ferð, tí at tingini blíva meira og meira uppá avstand. Eg havi ikki starv í Føroyum; eg havi ikki tað sama netverkið, sum eg hevði fyrr. Tað broytist eitt sindur fyri hvørt ár. Kanska vissi mann skal seta tað heilt spesifikt, so broytist tað fyri hvørt ár. Tað er ikki tað, at eg ikki føli meg heima, tað verður øðrvísi, í hvussu so er.*

### Aðrar viðmerkingar viðvíkjandi samleika

#### Danmark meira heimligt enn Bretland

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)**
*Fyri mær virkar tað, sum tey flestu í Bretlandi ætla sær heimaftur eitt ella annað tíðspunkt. Men í Danmark, har haldi eg, at tey [útisetarnir] eru komin til eitt land, sum liggur nokkso tætt við teirra kultur. Ella ein kultur, sum tey taka undir við. Í Bretlandi hava tey ein kultur, sum vit ikki taka undir við...tað er tí, at vit ikki kenna okkum heima her beint. Meðan í Danmark hava tey ein kultur, sum vit føroyingar hava lættari at taka undir við. Tí føla tey seg meira, haldi eg sjálvur, at mann følir seg meira heima har beint. Tað er ein av grundleggjandi tingunum. At mann kann síggja Danmark sum eitt heim.*

*(...) Altso, sjálvt eg havi búð her og verið ræðuliga lítið í Danmark, men eg hevði heldur vilja sæð Danmark sum eitt heim enn Bretland. (...) Vissi tú hyggur eftir Føroyum og Bretlandi...hvussu tætt vit eru uppá hvønn annan, men allíkavæl hvussu langt vit eru frá hvørjum øðrum. Tað kemur garanterað av tí, at vit hava tikið undir við tí donsku og skandinavisku mentanini og máta at liva uppá...har hetlendingar hava tikið fullstendiga undir við tí bretska. (...) Vit eru prekaði av einum meira skandinaviskum máta at liva uppá...lívsuppfatan meini eg. Og tí haldi eg tað vera lættari hjá okkum føroyingum at fara til Danmarkar og síggja tað, at har eru nógv ting...tí sjálvandi vit hoyra til Danmark, og tí eru nógv ting gjørd uppá sama máta í Føroyum og í Danmark.*

## <u>Framtíðarætlanir</u>

**Fari væntandi aftur til Føroya**

**Tá ið eg fái børn**

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (1)**
*Eg ætli mær ikki heim til Føroyar enn. Eg haldi, eg eri for ungur til at flyta heim til Føroyar enn. Tí at eg havi stadigvæk nøkur ting, sum eg vil uppliva, áðrenn eg fari heimaftur. (...) Men Føroyar eru við í ætlanunum. Eg ætli mær heimaftur. Grundin til at eg ætli mær heimaftur er, tí at eg føli meg øðiliga heldigan, at eg eri komin úr Føroyum, tí at eg haldi tað, at føroyingar hava nakað í sær, sum er gott ella soleiðis. Og eg haldi, at tað hevði verið synd fyri míni børn ikki at sloppið at vaksið upp í Føroyum. (...) So kanska tá tann kapittulin byrjar, tá...nei, tað noyðist ikki at vera beinan vegin, men tá ið tey blíva eitt sindur eldri, so vil eg gjarna heimaftur. Tað er tað, sum eg hugsi, ha? Men tað er ikki nakað fastlagt.*

**Vil hava royndir fyrst**

**Maður, 26, júst útbúgvin, 5. árið í Aberdeen**
*Eg hevði gott kunnað farið heim at búð nú, men so haldi eg, at eg hevði gingið glipp av nøkrum. Eitt er at hava lisið uttanlands, men eg haldi, tað er eitt sindur synd at leypa direkta heim aftaná. Uppá nógvar mátar. Bæði fyri mína egnu skyld, havi eingi børn ella nakað. Havi møguleika at búgva uttanlands og fáa nakrar erfaringar. Og eg vænti eisini at, altso, Føroyar sjálvt, samfelagið ella arbeiðspláss, at tað kemur eisini teimum til góðar, at eg havi verið úti og fingið erfaringar. Tað havi eg allatíðina ætlað mær. (...) Men eg vænti, at eg fari heim at búgva.*

*(...) Men tað sum hevði gjørt, at eg hevði fingið betri hug [at farið til Føroya], tað er arbeiði. Arbeiðsmøguleikar og alt tað, ha? Og sjálvandi eisini tað at fingið eina íbúð ella hús, sum liggur soleiðis nøkulunda væl fyri. Um eg hevði fingið bjóðað eina íbúð sum lá væl fyri og eitt arbeiði, so hevði eg smekkað til beint nú. Tað hevði hjálpt uppá mína avgerð. Men har eru ikki so nógv arbeiði innanfyri mítt øki í løtuni. Men hinvegin hevði eg gott kunnað búð í Føroyum, sjálvt um eg ikki arbeiddi fyri eitt føroyskt felag.*

**Vil sleppa at granska**

**Kvinna, 27, lesandi, 5. árið í Aberdeen**
*Eg ætli mær at fara heim til Føroya aftur einaferð, at arbeiða. Eg veit ikki akkurát hvat, men...eg giti at eg komi at sita á onkrari fyritøku...leiðari á onkrari deild ella samskipari av onkrum slag. Tað hugsi eg um, tí tað eru møguleikarnir í Føroyum, sum eg kann fyristilla mær at koma heimaftur til. Men tað, sum eg hevði tímað ordiliga væl, tað hevði verið at granska. Tað haldi eg ikki, tað er nakað beint nú. At menna føroyska samfelagið við at granska.*

**Veit ikki, um farið verður aftur til Føroya**

**Útbúgvingin hevur ein leiklut**

**Maður, 29, lesandi, 5. árið í London**
*Tá eg tók ta avgerðina at lesa ella blíva solicitor í enskari lóg, tá var tað heilt tilvitað, at eg fór at vera her í nøkur ár. Eg kann ikki brúka hana beinleiðis. Í hvussu so er ikki heima í Føroyum. Tú kann brúka hana aðrastaðni í heiminum. Eg hugsaði um at fara aftur til Føroyar, men tað var nakað, sum eg gjørdi mær greitt tá. Tað var ætlanin, og enn er ætlanin at vera her í nøkur ár. Eg dugi ikki at siga hvussu leingi; tvey ár, fimm ár, forever….eg veit ikki.*

*(...) tað eru nógv ting, sum ikki eru tilfredsstillandi við Føroyum, men samstundis er tað bæði…ja samleiki og øll familjan hjá mær býr í Føroyum. So tað eru hasi bæði, sum liggja í bakhøvdinum. Kanska um umstøðurnar broytast, soleiðis at Føroyar verður meira attraktivt (...). Eg vil siga tað, at eg havi valt ikki at hugsa so langt út í framtíðina.*

**Maður, 25, lesandi, 4. árið í Aberdeen (2)**

*Sjálvandi eg leingist til Føroya, tí tað er har mann...tað er har tað primera heimið uppá ein máta er. Men eg føli, at tað [tilknýtið til Føroyar] minkar eitt sindur. Tá ið eg hugsi um, hvat fari eg at gera í framtíðini. Tað verður allarhelst ikki í Føroyum. Kanska, men tað er líka stórur kjansur, um ikki størri kjansur, at eg verði uttanlanda, í Bretlandi ella onkra aðrastaðni. Kanska hevur tað okkurt við tann kensluliga innstillingin at...eg fari sikkurt at vera her. Eg havi verið her leingi, og eg fari at vera her í nøkur ár afturat. (...) tað hevur nógv við tað professionella at gera. Um eg skal arbeiða við tí, sum eg havi lisið.*

**Kanska seinni í lívinum**

**Kvinna, 34, arbeiðandi, 15. árið í London**

*Tú kann ikki gera eina fimm ára plan, tí tú veit aldrin, hvønn veg tað fer at venda seg. Og tann ósikkurheitin og… ja eg veit ikki...challenges, sum eg trívist best við. So mær dámar nokkso væl ikki at vita, hvat tey næstu 14 árini fara at innibera. (...) eg veit ikki, um eg eri ein sovorðin risikotakari ella hvat, men eg haldi ikki, at tað er tað. Tað er meira tað, at eg vil ikki binda meg í nakað spesifikt...um 14 ár ætli eg mær hetta og hatta*

*(...) nakað, sum eg plagdi at siga var, at tá eg fari at pensjonera meg, tá fari eg heim. Men tað er eisini soleiðis, at eg veit aldrin, hvussu tingini hjá mær fara at útvikla seg, og av tí at eg havi etablerað meg her. Eg havi ongantíð verið ein sovorðin persónur, sum hevur longst heim. (...). Eg haldi tað, sum fer at gera tað, at eg fari at flyta heim, kanska møguliga, í framtíðini eina ferð…langt frammi, er at kvaliteturin á lívinum heima í Føroyum er øðiliga høgur. Tú býr øðiliga væl, mann gloymir tað, tá mann ikki er har. So tað er nokk tað, sum fer at gera tað, at mann fær eitt øðiliga gott lív, tá einaferð seinastu helvtina av lívinum ella eitt ella annað.*

**Gott starv hevur nógvan týdning**

**Maður, 30, lesandi, 5. árið í London**

*Tað hevði kanska verið ein sjarma at farið heim í eitt ár av og á. Men vissi eg fari heim, so er tað ikki permanent. Um eg vendi heim seinni, tað veit eg ikki. Men eg haldi ikki, at eg tími hatta við at leggja endaligar ætlanir um, hvar eg vil búgva permanent. Tað dugi eg ikki at síggja nakra grund til longur. Og um eg skal heimaftur at arbeiða permanent í Føroyum, so skal tað vera á einum góðum arbeiðsplássi. Tað er heilt sikkurt. Eg síggi tað eitt sindur sum, at mann ofrar eitt sindur við at fara heimaftur, og eg skal hava eitt sindur afturfyri. Tað vil siga at arbeiðsplássið skal vera gott, og tað skal vera góð løn og so víðari.*

**Kvinna, 24, lesandi, 4. árið í Aberdeen**

*Eg haldi faktiskt, at um eg hevði fingið okkurt gott starv, at eg heilt sikkurt hevði viljað sloppið at roynt at búð í Føroyum. Men eg hevði ikki farið heim, um tað ikki var eitt ordiliga gott arbeiði.*

**Ikki møguligt at skráseta parlag**

**Kvinna, 25, arbeiðandi, 3. árið í London**

*Eg eri sjálv samkynd og partnarin hjá mær hevur fingið fimm ára uppihaldsloyvi [í Bretlandi], tí eg eri EU borgari við danska passinum hjá mær. So tað ger, at vit kunnu vera her. Í Føroyum kunnu vit ikki vera av fleiri orsøkum. Fyri tað fyrsta so er registrerað partnaraskap ikki góðkent í Føroyum, so hon kann ikki fáa uppihaldsloyvi. Hon er ikki evropeari, so hon skal eisini hava arbeiðsloyvi, og tað fær hon heldur ikki. Annað enn til at arbeiða við fisk, men hon er akademikari, so tað er nokk ikki tað, hon hevur í huga. Og so eisini tað professionella, sum eg havi valt at arbeiða við.*

*(...) Vit høvdu gjarna vilja farið eitt ár, vissi tað hevði borið til, tí at hon er fólkalívstónlistafrøðingur og vil gjarna granska í Føroyum, og ætlar sær kanska at gera tað og kanska fáa eitt sindur av stuðuli til tað. Um vit høvdu kunna farið eitt ár, so høvdu vit gjørt tað.*

*(...) Tað ber jú ikki til [at flyta til Føroya], uttan so at lóggevingin broytist. Tí eg ætli mær ikki at skiljast. (...) Tað er altíð ein møguleiki [at tað broytist]. Nógv er jú broytt. Føroyar*

*eru broyttar og samfeløg rundan um Føroyar eru broytt. Tað ger, at Føroyar eisini noyðist at broytast. (...) Um Føroyar ætlar at vera ein partur av øðrum felagsskapum, so broytast lógirnar fyri samkyndum...til dømis um tey skulu gera avtalur við ES, so mugu tey nokk broyta lógirnar, so samkynd sleppa at flyta aftur og fram. Tað er púra absurt, at eg kann flyta til Danmarkar við partnaranum hjá mær, men eg kann ikki flyta til Føroya.*